# FFbladið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 313 Hósdagur 11. mars 2004 12,-




## 103 ára gamal fótbóltsspælari

**Í næsta mánað fyllir Anna Askham, elsti føroyingur, 103 ár.**

**Umskipanin av fiskamarknaðinum er byrjað**

Síða 4

**Okkurt hevur nýggi landsstýrismaðurin til felags við Johan Dahl!**

Síða 5

**Nú verður kanska nakað gjørt fyri at varðveita rækjuflotan**

Vónandi tekur Bjørn við, har Johan slepti.

Síða 5

## Malmberg:

# Skotin niður av torpedo!

**Malmberg var á veg til botns... Vit hava ta ótrúligu søguna um bjargingina av teimum trimum við "Tór II"**

Síða 9






# Føroyskur tíðindaflutningur í mun til BBC

**Meðan t.d. BBC, sum høvuðsreglu, kannar øll tíðindi, er fráboðaða høvuðsreglan hjá føroyskum fjølmiðlum, at sannleikavirði í politiskum tíðindum verður ikki kannað. Hetta heldur umboðsmaðurin vera í lagi.**

Síða 6









FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prenttilgerð: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag



*Her síggja vit Jógvan saman við dóttrini Eyðgerð Kruse, sum skrivar Dimmalætting. Langabbi hennara, Jóan Símun Isaksen, Norðagøtu, var ein av stovnarum FFs í 1910. Tað sama var langabbi Lars, Doreus Jacobsen. Jóan Símun og Doreus vóru grannar tá.*

### Borgmeistarin í Hósvík:

# Ársins fyrstihjálpari

**Týsdagin, 17. februar tilnevndi Reyði Krossur ársins fyrstahjálpara fyri 2003.**

Suni Winther, formaður í Føroya Deild á Reyða Krossi, segði á samkomu, at ársins fyrstihjálpari í Føroyum varð valdur fyri fyrstu ferð árið 2001. Hetta tiltak byrjaði í Danmark fyri 13-14 árum síðani, og hjá okkum er hetta nú triðja árið, at skipað verður fyri hesum.

Suni Winther segði millum annað: "At vit gjørdu rætt í at seta hetta tiltak á skránna hjá okkum, fingu vit fleiri váttanir fyri, við tað at fólk bóru okkum stóra tøkk fyri, at vit soleiðis veita teimum eina tøkk, ið á so fyrimyndarligan hátt høvdu veitt hjálp til skadd ella skelkaði medmenniskju".

Suni takkaði Tryggingarfelagnum Føroyar ella OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA, sum tað nú eitur, fyri at stuðla tiltakinum. Eisini takkaði hann teimum, sum hava sent uppskot um evni til hesa tilnevning.

Evnini, Reyði Krossur hevur fingið í uppskoti, eru hesi – nevnd í raðfylgu fyri hendingini:

**Jógvan Mørkøre,** 48 ár, búsitandi í Hósvík, sum tann 16. juni 2003 kemur fram við monnum við Áir og sær, at okkurt óvanligt er áfatt. Jógvan fer á staðið at vita, hvat er hent.

Har er hent tað, at menn eru farnir eftir seyði og ein er áhaldsin, dettur og stingur seg í lærið við saksinum. Tað bløðir sera illa og menninir á staðnum royna at lyfta beinið upp, fyri á tann hátt at minka/steðga bløðingini, sum var ógvuslig, og maðurin tyktiskt nær við at svíma.

Jógvan skipar fyri at kompress verður lagt á, so bløðingin minkar/ steðgar og roynir at sissa hinar menninar, sum ikki eru sørt skelkaðir.

Tá sjúkrabilur nakað eftir kom, varð sagt, at arbeiðið hjá Jógvani var væl gjørt.

Hin skaddi kom seg, men hevði langa sjúkralegu og ringdi til avvarðandi hjá Jógvani at takka fyri hjálpina.

**Lars Martin Bjarkhamar Müller,** 30 ár og **Mariann Reinert** 26 ár, bæði búsitandi í Havn og arbeiða sum løgreglufólk.

Tann 21. juni 2003 kl. 03.55 vórðu tey send oman til Havnar Klubba, tí uttanfyri var maður dottin og svímaður. Tá tey komu oman, var tilkallaði sjúkrabilurin ikki komin, tí teir høvdu aðra uppgávu, so Lars Martin og Mariann fóru beinanveg í gongd við at geva hinum svímaða fyrstuhjálp og hjartamassagu, til sjúkrabilurin kom á staðið.

**Maðurin kom seg væl**

At tey bæði gjørdu eitt gott arbeiði sæst eisini av, at tey hava fingið sømdargávu frá Rigspolitichefen.

**Sigmund Petur Berthel Petersen,** 30 ár, búsitandi í Skálafirði og arbeiðir sum politistur í Havn.

Sigmund varð boðsendur til eitt ferðsluóhapp norðuri við Áir 31. august 2003 kl. 06.13, har álvarsligt ferðsluóhapp var við 6 persónum í einum bili.

Sigmundur gjørdi eitt gott avrik á staðnum, har hann fekk boðsent hjálp og skipaði fyri at onnur, ið komu framvið, hjálpu til.

Hann var umhugsin og gav skaddum teppi og sín egna jakka at hita seg við, og hann fór eisini sjálvur



*Mariann og Lars fingu heiðursbræv.*

ROKNSKAPUR 2003

| RAKSTRARROKNSKAPUR | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| | t.kr. | t.kr. |
| Rentuinntøkur v.m. | 154 | 319 |
| Vinningur av partabrøvum v.m. og øðrum kapitalpartum | 7 | 0 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v.m. | 3.172 | 6.901 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir v.m. | -202 | -320 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra v.m. | 524 | -420 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 8.260 | 3.041 |
| Úrslit av fíggjarpostum | 11.915 | 9.521 |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | -7.531 | -7.247 |
| Avskrivingar av ítøkiligum og bókiligum ognum | -182 | -312 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -1.689 | -1.402 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 2.513 | 72 |
| Óvanligar útreiðslur | -96 | 0 |
| Úrslit áðrenn skatt | 2.417 | 72 |
| Skattur | -469 | 0 |
| Ársúrslit | 1.948 | 72 |

| FÍGGJARSTØÐA | 31/12-2003 | 31/12-2002 |
|---|---|---|
| OGN | | |
| Áogn hjá kreditstovnum v.m. | 3.590 | 7.409 |
| Lánsbrøv v.m. | 0 | 10 |
| Partabrøv v.m. | 5.167 | 3.114 |
| Ítøkiligar ognir | 281 | 247 |
| Onnur ogn | 69 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 5.954 | 1.559 |
| OGN TIL SAMANS | 15.061 | 12.339 |
| SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR | | |
| Onnur passiv | 1.314 | 444 |
| Tíðaravmarkingar | 368 | 464 |
| Eginpeningur | | |
| Partapeningur | 10.000 | 10.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.914 | 1.914 |
| Flutt úrslit til samans | 1.465 | -483 |
| Eginpeningur til samans | 13.379 | 11.431 |
| SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR TIL SAMANS | 15.061 | 12.339 |
| Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna | | |
| Ábyrgdir | 116 | 44 |

KAUPTHING
[illegible]

at geva fyrstuhjálp til álvarsliga løstaðan, svímaðan persón. Hesin doyði tó av sínum løstum.

At Sigmundur gjørdi eitt gott arbeiði sæst eisini av, at hann hevur fingið sømdargávu frá Rigspolitichefen fyri sítt dugnasemi.

Jógvan ársins fyrstihjálpari

Grundað á eina meting av hesum tilburðum, varð Jógvan Mørkøre útnevndur til ársins fyrstahjálpara. Hann fekk útnevningina saman við pennasetti. Afturat hesum fekk hann ein kekk frá Tryggingarfelagnum.

Jógvan greiddi frá, at hann hevði tikið skeið í fyrstuhjálp fyri nógvum árum síðani, og var hetta komið honum til nyttu í hesi støðuni.

Hini, sum vóru í uppskoti, fingu heiðursbræv saman við pennasetti.



*Her fær Sigmund Petur heiðursbræv.*



*Nevndarlimirnir á Reyða Krossi, sum vóru til staðar. F.v. Øssur av Steinum, Jóhanna Garðshorn, Suni Winther og Súsanna Joensen.*

# Stokkfiskur hevur verið framleiddur í Føroyum

Í seinasta blað høvdu vit eina frásøgn frá ráðstevnu í Noregi, har spurningurin um at fáa nyttu burturúr slógvi og innvøli varð viðgjørdur. Har greiddu vit frá, at meðan íslendingar høvdu framleitt nógvan stokkfisk gjøgnum tíðirnar, hevði hetta ikki verið gjørt í Føroyum.

Hetta er ikki heilt rætt. Vit vórðu um dagarnar uppringdir av lesara í Haraldssundi. Hann segði frá verfaðir sínum, sum var ættaður av Skarði, at har høvdu teir framleitt stokkfisk.

Vit hava so spurt tann 98 ára gamla Eliesar Sørensen av Kirkju um hetta mál. Pápi hansara plagdi at keypa fisk, og tí kennir Eliesar til virking av fiski í gomlum døgum. Eliesar váttar, at teir plagdu at heingja fisk upp at turka til útflutnings. Hann heldur, at hetta kann eisini hava verið, tá teir vóru í uppisetri við salt, og so kundi hetta vera loysnin.

Jóan Pauli Joensen greiðir eisini frá hesum í bókini Fiskafólk. Hann greiðir frá, at tann smærri fiskurin varð hongdur upp heilur, og tann størri varð ráskorin.



*Hetta er lendingin á Skarði. Sum tað sæst, hevur tað verið strævið at róð út her. Tað hevur kanska verið fyri at lætta um, at teir hava turkað fiskin heldur enn at salta hann. Tá spardist í hvussu er flutningur av salti.*



**Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:**

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

**Sp/f Úrvalsbilar**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444943 · 281943 · 217704

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

**Pf. Petur Larsen**
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

**AGN**



**sild
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur**

hava dagligt samband um alt landið

**P/F KAMBUR**

STRENDUR · telefon: 447720
ella 448095 · fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

# Nú verður farið í gongd við at umskipa fiskamarknaðin





*Nevndin, sum arbeiðir við umskipanini av fiskamarknaðinum, eru f.v.:*
*(ovara myndin) Egil Olsen, John Nielsen, Harry Benjaminsen, Jógvan Norðbú, Árni Joensen, (niðara myndin) Óli Jacobsen og Agnar Jensen.*

Sum tað hevur verið umrøtt fyrr, hevur í langa tíð verið arbeitt við hugskotinum at umskipa fiskamarknaðin. Aftanfyri hesa umrøðu liggur tað sjónarmið, at tað eiga at vera vinnufeløgini sjálvi, sum eiga og reka sína egnu uppboðssølu. Harvið hevur vinnan sjálv ræði á skipanini og eigur eitt møguligt yvirskot. Tað hevur ikki verið hildið, at verandi eigaraskari í fiskamarknaðinum lýkur hesar treytir, tí av vinnufeløgum eru tað bert FF og Tofta Arbeiðarafelag, sum eru partaeigarar.

Tískil hava verið tveir møguleikar. Annar var at ráfiska- og seljarafeløgini stovna sína egnu uppboðssølu, ella at fiskamarknaðurin á Toftum varð umskipaður.

Hetta er so tað, sum er hent. Partarnir í málinum hava samtykt at arbeiða fram ímóti eini loysn, sum er grundað á fylgjandi sjónarmið:

1. Verandi uppboðssøla verður broytt til bert at gerast landingarmiðstøð.
2. Síðani skal stovnast eitt nýtt partafelag, sum skal reka uppboðssølupartin hjá verandi partafelag.
3. Ráfiskakeypara- og Ráfiskaseljarafelagið seta hvør síni 25% í felagið, meðan fiskamarknaðurin við verandi partafelag setur 50% í.
4. Nevndin í nýggja felagnum skal vera samansett soleiðis, at Ráfiskakeypara- og seljarafelagið eiga helvtina av nevndarlimunum, og fiskamarknaðurin hina helvtina. Av hesum skal eitt umboð vera frá Fiskimannafelagnum. Tá koma tey feløgini, sum beinleiðis umboða keyparar og seljarar, at hava beinleiðis meiriluta í nýggja felagnum, bæði við partapeningi og nevndarsamanseting. Samstundis verður forðað fyri "majorisering" við einstøkum dominerandi partaeigarum. Strembast skal eftir, at Ráfiskakeyparar og -seljarar hava somu umboðan/ávirkan í nýggja felagnum.

### Fyrireikingarnar byrjaðar

Hendan ætlan er nú komin so mikið langt, at tað er sett ein nevnd við umboðum fyri allar tríggjar partar at fyrireika nýggju uppboðssøluna. Teir fyrstu fundirnir hava verið. Nógv formelt er at fáa uppá pláss. Partafelag skal stovnast við øllum teimum viðtøkum og reglum, sum fylgja við. Síðani skal ætlanin leggjast fyri hægsta myndugleika hjá pørtunum til góðkenningar.

So er spurningurin, hvat ein umskipað uppboðssøla kann gera betri enn tann gamla. Her til er fyrst at siga, at tann nýggja kemur at byggja á ta gomlu. Sigast kann eisini, at eingin skipan er so góð, at hon ikki kann gerast betri. Eitt hugskot er, at uppboðssølan skal vera "breiðari", so størri partur av fiskakeyparum og seljarum koma at nýta hana. Tað kann eisini hugsast ein skipan, har útlendingar í størri mun koma bæði at keypa og selja gjøgnum uppboðssøluna. Hetta skuldi kunnað økt um kappingina um fiskin. Hon kann eisini koma at umfata onnur fiskasløg enn tey, sum í dag eru vanlig, til dømis ídnaðarfisk.

Vónandi verður umskipanin klár til várs, og so kunnu vit bert vóna, at tað kann fara at bera til at taka broddin av teimum viknandi prísunum.

# Brúkarin heldur at ongin fiskur er eftir í havinum

Nógva fjølmiðlaumtalan í ES seinastu árini um niðurfiskaðar fiskastovnar hevur gjørt at eftirspurningurin eftir fiski er fallin. Hetta sæst beinanvegin aftur í fiskaprísunum, eisini í Føroyum. Tað er drúgt arbeiði at sannføra stórar brúkarabólkar um at teir ikki skulu hava ringa samvitsku av at eta fisk.

Samlaða veiðan í ES sjógvi er nógv minka seinastu árini. Í fjør var kvotaniðurskurðurin í Norðsjóvnum serliga stórur og tað sær út til at kvoturnar minka uppaftur meira í ár. Undir vanligum umstøðum vildi hetta ført við sær at prísurin á hesum fiskavørum fór upp tí at minni var boðið út á marknaðinum. Men soleiðis hevur støðan ikki verið í fjør. Samstundis sum nøgdirnar av fiski eru minkaðar eru prísirnir eisini falnir.

Hetta ávirkar sjálvandi eisini prísirnar sum føroyingar fáa fyri fiskin tí meginparturin av okkara fisk i verður seldur á ES marknaðinum.

Fiskivinnufelagsskapir í marknaðarlondunum siga at orsøkin til hetta er at finna í einum fallandi eftirspurningi sum fyri ein stóran part kemur av negativari umtalu sum fiskivinnan hevur fingið í fjølmiðlunum. Í kjakinum um niðurskurð av fiskivinnuni í ES sjógvi er brúkarin undirdíktur í tíðindum um at lítið og einki er eftir av fiski í havinum. Stórir partar av brúkarunum eru komnir til tað fatan, at tað sindri av smáum fiski sum eftir er verður veitt áðrenn fiskurin er kynsbúgvin og tí ikki nær at seta næsta ættarlið við.

Í einari ofta misfataðari umsorgan fyri fiskastovnunum leggja áhugafelagsskapir ábyrdina fyri vælferð ella týning av fiskastovnunum yvir á samvitskuna hjá hvørjum einstakum brúkara. Vanligi brúkarin sum ikki kennir til fiskastovnar, fiskasløg og fiskileiðir kring heimin hevur ongan møguleika at skilja smálutir og mun á hvørji fiskasløg og stovnar eru niðurfiskaðir og hvørji ikki eru hótt. Brúkarin fær tí ringa samvitsku hvørja ferð hann etur fisk og kennir seg at verða part av týning av fiskimargfaldinum í havinum.

Støðan hevur fingið fiskivinnufelagsskapir í flestu ES londunum at fara í herna ímóti hesari misfatan.

Eitt nú í Svøríki staðfesti Christina Stenberg, stjórin í Svensk Fisk, í fjølmiðlunum fyri tveimum vikum síðani, at allur fiskur sum brúkarin møtir í handlunum er veiddur og skrásettur eftir lóligum kvotum, ásettar av ES. Um tað finst grund til at halda at eftirlitið ikki er nóg gott eigur politiska skipanin at syrgja fyri at betra eftirlitið. Brúkarin skal kenna seg tryggan í valinum av matvørum. Tað skapar ótryggleika millum brúkararnar tá teir fáa mótstríandi tíðindi og verða tvungnir til at taka støðu til allar smálutir sjálvir. Hendan uppgávan krevur alt ov nógva tíð og kreftir og er alt ov torført fyri hvønn einstakan.

Í Bretlandi hevur Seafish lagt dent á at lýsa støðuna hjá toski. Á einum langum lista við upplýsningum um tosk og toskaveiðu verður m.a. staðfest:

Meðan tað verður arbeitt við at byggja uppaftur toskastovnin í Norðsjónum kemur 90% av toskinum sum verður etin í Bretlandi frá øðrum veiðuøkjum.

Pástandurin um at toskurin er hóttur við týning er skeivur. Nú stovnurin er minkaður nakað verða tiltøk sett í verk fyri at byggja hann uppaftur.

Toskur sum fiskaslag livir í øllum Norðuratlants havinum við serstøkum stovnum á leiðunum við Norðuramerika, Grønland, Ísland, Føroyar, Írska havinum, Norðsjónum, Barentshavinum, Skagerak og í Eystrasalti.

Einans 3% av toskaveiðuni kemur úr Norðsjónum. Meginparturin kemur úr Barentshavinum (47%) og undan Íslandi (27%). Toskakvoturnar har verða hækkaðar í 2004 orsaka av góðari fiskiveiðustýring.

Vónandi koma slík tiltøk at normalisera hugburðin um fisk og fiskiveiðustýring soleiðis at eftirspurningurin kemur uppaftur á eitt meira normalt støði.

# Nú verður kanska nakað gjørt, fyri at varðveita rækjuflotan

**Spurningurin um støðuna hjá rækjuflotanum, hevur spøkt nú í langa tíð. Spurningurin hevur verið, um nakað skuldi gerast fyri at varðveita hann, ella um bert skuldi latast standa til.**




*Íslendska fiskivinnublaðið Fiskifrettir kundi herfyri greiða frá nýggjasta skipinum í íslendska flotanum "Guðmundur í Nesi". Stór frásøgn er í blaðnum frá hesum "glæsiliga" skipi við allari teirri útgerð, sum finst umborð.*

*Tað syrgiliga hjá okkum er bert, at hetta er fyrrverandi "Hvilvtenni", sum ikki hevði møguleikar í Føroyum, men sum hevur teir í Íslandi í staðin. Tað skal tó sigast, at teir fara ikki á rækjuveiðu, men á svartkalvaveiðu.*

Tað er hetta seinna, sum er gjørt, og úrslitið er so, at talið av rækjuskipum undir føroyskum flaggi er alsamt minkað, og millum hesi, er nýggjasta rækjuskipið í flotanum "Hvilvtenni".

FF hevur – eins og onnur feløg í vinnuni – heitt á myndugleikarnar um at taka stig til at varðveita hendan partin av flotanum. Hetta er ikki minst týdningarmikið, tá hugsað verður um, at aðrar vinnur standa við "gravens rand".

Tað skal sigast, at nýggi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Johan Dahl, hevur gjørt skjótt av. Hann hevur tikið avgerð um at seta eina nevnd at viðgera støðuna hjá rækjuvinnuni við hesum arbeiðssetningi:

- at útgreina verandi støðu hjá rækjuvinnuni.
- at meta um framtíðar veiði- og marknaðarviðurskifti.
- at koma við uppskoti til eina loysn.

Nevndin verður umboðað av fólki frá grannskoðarafyritøkunum hjá Paula Ellefsen og Claus Rasmussen og við umboðum frá Reiðarafelagnum, Fiskimannafelagnum og Fiskimálaráðnum. Formaður í nevndini verður Jørmann Petersen, og skrivari verður Símun Joensen. Hesir báðir starvast í Fiskimálaráðnum.

Miðað verður ímóti, at nevndin verður liðug við arbeiðið innan ein mánaða.

Vit kunnu bert fegnast um, at hetta arbeiðið loksins verður gjørt, so tað í hvussu er kann staðfestast, hvørt grundarlag er fyri at gera nakað ella ikki, fyri at varðveita hesa vinnu, sum einaferð var okkara "reyðargull".

Hendan greinin varð skrivað meðan Johan Dahl framvegis var landsstýrismaður. Væntandi tekur nýggi landsstýrismaðurin um endan her.

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
*Umsjónarmaðurin*
FO-700 Klaksvík
Tlf: (+298) 45 54 63, lokal 123
Fax: (+298) 45 73 63

## Hjálparfólk søkist til røntgendeildina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Talan er um eitt tíðaravmarkað starv frá 15.03.04 til 28.02.05. Arbeiðstíðin er 0,5. Starvið er ætlað ungum, sum hava ætlanir um at fara í gongd við eina útbúgving innan sjúkrahúsverkið.

Umframt skráseting og skjalagoymslu av kanningum gjørdar á sjúkrahúsinum, fevnir starvið um fyrifallandi arbeiði á sjúkrahúsinum.

Kunnleiki til teldu er ynskiligt, men tó ongin treyt.

Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála við starvsmannafelagið lønarflokk 1 ella 2.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Janu Petersen, I. assistent telefon 455463 lokal 411 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

Umsókn við møguligum ummælum skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
*Umsjónarmaðurin*
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 01.03.03

# Føroyar á odda

**Bodø:** Norske fiskere er dobbelt så effektive som gjennomsnittet i Europa. Det viser en fersk lønnsomhetsanalyse av de europeiske fiskeriene. Det er likevel et stykke igjen før Norge passerer Færøyene og Island, skriver Fiskaren.

– Lønnsomhetsanalysen viser at de norske fiskerne kommer svært godt ut dersom man ser på produktivitet per sysselsatt fisker. Mens gjennomsnittlig fangstverdi per fisker i Europa lå på 43.000 euro i 2002, kunne Norge vise til en fangstverdi som er mer enn dobbelt så høg. Det viser at de norske fiskerne er effektive i en europeisk sammenheng, sier professor Ola Flåten ved Norges Fiskerihøgskole.

### Færøyene på topp

Det er i forbindelse med et EU-finansiert forskningsprosjekt at professor Ola Flåten og forskerkolleger rundt om i Europa har utført en lønnsomhetsanalyse av de europeiske fiskeriene i 2002. I tillegg til å se på lønnsomhet, sysselsetting, fangstverdi og fangstvolum, har Flåten og Co også forsøkt å trekke ut de viktigste utviklingstrekkene for 2002 og 2003. Totalt er 89,000 fiskere fordelt på 27,600 fartøy fra 20 land med i undersøkelsen. Selv om fiskeriene i de ulike landene varierer både i geografi, type og omfang, mener forskerne at tallmaterialet de har kommet fram til egner seg godt til sammenligning.

### Flinke

– Norge har en god verdiskapning, men det er andre land som produserer mer per sysselsatt fisker enn de vi gjør. Færøyene og Island har tradisjonelt sett vært mer effektive enn oss. Det ser vi også i denne analysen her. Også Nederland og Belgia kommer godt ut. De har etter hvert effektivisert fiskeriene gjennom systemet med omsettelige kvoter. Fiskerettighetene er i større grad konsentrert, sier Flåten.

Lønnsomhetsanalysen viser at Norge i 2002 sto for 22,3 prosent av landingene målt i volum og 12,7 prosent av landingene målt i verdi. Selv om verdien av de landede fangstene til Norge gikk noe ned, sier Flåten at bruttoverdiskapningen og nettokontantstrømmen til rederne ble noe bedre.

Selv om det har vært noen svinginger i lønnsomheten i de norske fiskeriene, sier økonomiprofessoren i Tromsø at pila stort sett har pekt jevnt oppover siden. Denne positive utviklingen ser man også i en rekke av de andre landene.

Sammenlignet med 2001 gikk verdiskapningen i 2002 ned med syv prosent, mens sysselsettingen gikk tilbake med ti prosent.

Ifølge forskerne indikerer dette at forbedret produktivitet og økte inntekter. Generelt sett konkluderer Flåten og Co med at cirka 80 prosent av den europeiske flåten kunne vise til en god økonomisk utvikling i perioden 2000 til 2002. Når det gjelder 2003, er forskerne likevel ikke fullt så optimistiske.

– Vi forventer nedgang i både inntekter og kostnader for 2003, men nedgangen i inntekter er større enn nedgangen i kostnader slik at det endelige resultatet vil bli dårligere, sier Flåten.

**FF-blaðið**
**www.fiskimannafelag.fo**

**Innleggið, sum ikki verður hildið á fjølmiðlafestivalinum:**

# Føroyskur tíðindaflutningur í mun til BBC!

**Meðan fjølmiðlar uttan um okkum royna at hava álítandi tíðindaflutning er høvuðsreglan hjá okkara fjølmiðlum, at "vanligt er ikki at eftirkanna sannleikavirði í (m.a. politiskum) tíðindaskrivum". Her er bert eitt dømi av mongum um tíðindaflutning, sum er grundaður á hendan "tíðindapolitikk", sum annars er blástemplaður av Løgtingsins Umboðsmanni.**

## Pressuetiskar reglur

Fjølmiðlarnir í Danmark og Grønlandi hava sínámillum ásett hesar reglur fyri teirra tíðindaflutning:

Korrekte meddelelser:

1. Det er mediernes opgave at bringe korrekt og hurtig information. Så langt det er muligt, bør det kontrolleres, om de oplysninger, der gives er korrekte.
2. Kritik bør udvises over for nyhedskilderne, i særdeleshed når disses udsagn kan være farvet af personlig interesse eller skadevoldende hensigt.
3. Oplysninger, som kan være skadelige, krænkende eller virke agtelsesforringende for nogen, skal efterprøves i særlig grad, inden de bringes, først og fremmest ved forelæggelse for den pågældende.
4. Angreb og svar bør, hvor det er rimeligt, bringes i sammenhæng og på samme måde.
5. Det skal gøres klart, hvad der er faktiske oplysninger, og hvad der er kommentarer.
6. Overskrifter og mellemrubrikker skal i form og indhold have dækning i den pågældende artikel og udsendelse. Det samme gælder de såkaldte spisesedler.
7. Berigtigelse af urigtige meddelelser skal finde sted på redaktionens eget initiativ, hvis og så snart kendskab til fejl af betydning i de bragte meddelelser indgår. Berigtigelsen skal foretages i en sådan form, at læserne, lytterne eller seerne får klar mulighed for at blive opmærksom på berigtigelsen.

*Høvuðsreglan fyri føroysku fjølmiðlarnar er, at ongar av hesum reglum verða hildnar.*

*Um vit ganga út frá, at pkt. 1 er høvuðsreglan, so er hon beinleiðis í stríð við almennu útsøgnina hjá útvarpsstjóranum, um at "vanligt er ikki at eftirkanna sannleikavirði í tíðindaskrivum, sum ein tingbólkur... (letur) frá sær...*

*Taka vit pkt. 2, so má hetta verða serliga viðkomandi fyri politisk tíðindaskriv, sum serliga ofta mugu metast at vera "farvet af personlig interesse". Tað vóru tey í hvussu er í hesum førinum.*

*Men hetta verður ikki av umboðsmanninum mett at vera nakar trupulleiki!*

*Taka vit pkt. 3, so eru tað ikki meir enn fáar vikur síðani, at Vinnuhúsið kundi vísa á, at hendan reglan varð brotin.*

---

Fyrrverandi norski uttanríkisráðharrin Thorvald Stoltenberg hevur játtað at vera formaður í nevndini, sum skal kanna, hvønn hermálsligan týdning Føroyar og Grønland hava havt síðan 1945, og hvørjar fyrimunir Danmark hevur havt av NATO – støðunum í Føroyum og Grønlandi.

Stoltenberg hevur ikki bert royndir sum verju – og uttanríkisráðharri. Hann hevur eisini verið ST kommiserur fyri flóttafólk og ST semingsmaður í gamla Jugoslavia. Í dag er hann forseti í norska Reyða Krossi.

Fimm limir eru í nevndini, sum skal kanna, hvussu týðandi Føroyar og Grønland hava verið hermálsliga.

*Soleiðis vóru umrøddu tíðindini lýst í Degi og Viku. Tíðindini vóru ósannlík og skeiv, men ikki ein fjølmiðil gjørdi sær ómak at kanna tey. Men samb. umboðsmanninum er einki grundarlag fyri at finnast at slíkum tíðindaflutningi!*

---

Í ovurmorgin verður ein fjølmiðlafestivalur, har fjølmiðlafólk og onnur áhugað hittast at tosa um felags áhugamál. Men eftir skránni er einki sum bendir á, at hetta verður annað enn ein hugnaløta uttan veruliga viðgerð av leiklutinum hjá føroysku fjølmiðlunum sum 4. statsmaktin. Hetta er spell, tí tann sum fylgir við í føroyskum tíðindaflutningi, kann ikki ivast í tørvinum á viðgerð av, hvussu føroyskur tíðindaflutningur røkir hesa uppgávu.

Vit eru so væl fyri, at tað ber væl til at gera sammetingar við, hvussu viðurskiftini eru skipað uttanlands á hesum øki. Seinasta dømið um, hvussu tíðindaflutningur virkar í einum skipaðum samfelag, er sakin um BBC og David Kelly. Hetta mál endaði sum kunnugt við, at ein dómari, Hutton, varð settur at kanna ein ávísan tíðindaflutning.

Vanliga verður BBC roknað at hava ein tann mest álítandi tíðindaflutningin yvirhøvur. Teir hava eina fasta skipan fyri eftirliti við, at teirra tíðindi eru óheft og álítandi, og reglurnar fyri hesum eftirliti fylla nærum eina heila bók.

Í hesum eina førinum kom Hutton tó eftir, at ávís tíðindi vóru skeiv og misvísandi, og at eftirlitsskipanin við, at tíðindini vóru eftirfarandi, hevði svikið. Men tað óhepna var, at eftir at BBC var gjørt vart við, at tað vóru ítøkiligir skeivleikar í tíðindunum, helt BBC uppá sín órætt.

Tað, at **eini** tíðindi í BBC vístu seg at vera skeiv, hevur havt ógvusligar avleiðingar fyri stovnin. Trúvirðið er skalað so mikið, at sovæl stýrisformaðurin sum stjórin fyri BBC løgdu frá sær í stundini. Og BBC lovar høgt og heilagt at taka stig, sum skulu forða fyri, at so mikið sum eitt slíkt mál skal kunna endurtaka seg, so fólk aftur skal kenna seg trygt við tíðindum frá teimum.

### Føroyskt dømi

Her skal bert takast eitt dømi um serføroyskan tíðindaflutning, sum líkist Hutton/Kelly málinum so mikið, at tað ber til at samanbera, eisini tí at her hevur ein (fyrrverandi) dómari verið inni í myndini. Hetta dømi lýsir tó væl tíðindaflutningin í Føroyum yvirhøvur.

Søgan er, at í mars í 2002 kundu allir teir fýra stóru fjølmiðlarnir boða frá, at fyrrverandi norski ráðharrin og sendiharrin í Keypmannahavn, Thorvald Stoltenberg, hevði játtað at vera við í einum bólki hjá Norðuratlantsbólkinum, hvørs uppgáva var, at kanna og lýsa m.a. hernaðarlig viðurskifti hjá Føroyum og Grønlandi í ríkisfelagsskapinum. Flestu av fjølmiðlunum útgreinaðu neyvari, at her var fyri ein stóran part talan um eina kanning av, hvussu nógv ið danir høvdu vunnið uppá NAT0-herstøðir m.a. í Føroyum.

### Ósannlík tíðindi

Tað vóru mong, sum undraðust á hesi tíðindi, tí tey vóru sera ósannlík. Hjá tí, sum kennir tað minsta til politisk viðurskifti, ljóðaði tað sera løgið, at ein politikari á slíkum støði, sum enntá hevði verið norskur sendimaður í Danmark, fór at leggja seg úti innanhýsis viðurskifi í danska ríkinum. Ikki minst, tá tað er alment kent, at hetta er eitt sera eymt mál.

Seinni vísti tað seg, at allir teir – eftir egnum tykki – professionellu fjølmiðlarnir høvdu borið hesi tíðindi víðari, uttan at kanna tey. At kanna hetta nærri hevði verið lættasta ting av verðini. Hóast Stoltenberg stendur í telefonbókini, var **ikki ein** journalistur í so mikið sum **einum** fjølmiðli, sum ringdi mannin upp at fáa hetta váttað ella útgreinað.

Høvdu teir gjørt tað, høvdu teir longu tá fingið at vita, at víst hevði Stoltenberg játtað at vera NA bólkinum til hjálpar í **trygdarpolitiskum spurningum,** sum er eitt sera vítt fyribrigdi. Men tá hann fekk nærri at vita, hvør uppgáva var ætlað honum, segði hann nei. Hetta var ein púra greið, logisk og forútsigilig støða hjá Stoltenberg. Hervið varð váttað, at tað var einki grundarlag fyri tíðindini um, at hann hevði játtað at kanna innanhýsis hernaðarlig viðurskifti í danska ríkinum, sum annars einki høvdu við **trygdarpolitikk** at gera.

Hevði málið verið kannað eftir vanligum fjølmiðlareglum, hevði grundarlagið verið tikið undan hesum tíðindum, og málið varð harvið úti av verðini.

Men hetta innlýsandi stig, at kanna eini ósannlík tíðindi, varð ikki tikið av so mikið sum av einum fjølmiðli. Tí vórðu tey eisini standandi, sum um tey vóru sonn. Samstundis kundi ein politiskur bólkur gera sær dælt av hesum skeivu tíðindum.

Tá sannleikin í málinum kom fram nakrar vikur eftir hetta, var hetta av tilvild, tí "onkur kendi onkran" sum kannaði málið, og tað var avgjørt ikki takkað nøkrum journalistiskum avriki hjá umrøddu fjølmiðlum, at hetta kom fram.

Tá fjølmiðlarnir kundu staðfesta, at teir høvdu borið skeiv tíðindini kundi ein kanska vænta, at teir fóru at biðja um umbering fyri, at teir høvdu villeitt Føroya fólk, og at teir fóru undir eina sjálvrannsakan av, hvussu slíkt kundi henda, og hvussu tað kundi sleppast undan at slíkt hendi aftur. Teir áttu eisini at harmast mótvegis høvuðspersóninum í málinum, at teir høvdu bryggjað so nógv uppá hansara upprunaligu tilsøgn, at hann kendist als ikki við hesi tíðindi, tá tey komu fram.

Hetta kom so als ikki uppá tal. Í staðin varð Stoltenberg sjálvur misteinkiliggjørdur og mestsum gjørdur til orðloysing í einum máli, har hann fyrst hevði víst vælvild og síðani tikið eina sjálvsagda støðu.

Tað varð gjørt eitt tillop til at fáa kannað, hví upprunakeldan til tíðindini ikki sjálv hevði syrgt fyri at fáa tey rættað. Men hetta varð kvalt í føðingini!

### Okkara egna dómarakanning

Tað áhugaverda í hesum máli er, at her fór eisini fram eitt slag av "dómarakanning", har Løgtingsins Umboðsmaður kom at viðgera málið, sum tað varð lýst í útvarpinum.

Tað kom í hvussu er tað burtur úr hesi viðgerð, at útvarpið "kom til" at lýsa sín arbeiðshátt at tryggja røtt tíðindi. M.a. sigur útvarpsstjórin:

*"Í hesum sambandi hevur ÚF endurgivið tíðindaskriv hjá einum tingbólki á Fólkatingi. Vanligt er ikki at eftirkanna sannleikavirði í tíðindaskrivum, sum ein tingbólkur... (letur) frá sær, uttan so at ein frammanundan hevur royndir við, at viðkomandi er óálítandi, ella at annar illgruni er um, at innihaldið ikki er í lagi."*

Fyrst er at siga, at júst í hesum máli skuldi verið orsøk til – út frá grundgevingunum hjá útvarpsstjóranum sjálvum – at eftirkanna umrødda tíðindaskriv. Men hetta varð sum sagt ikki gjørt. Og tá tað ikki varð gjørt í hesum førinum kann ein róliga ganga út frá, at hetta ikki verður gjørt, og hetta er eisini í samsvar við royndirnar av tíðindaflutninginum.

Hetta er í veruleikanum ein ásannan av, at hvør politiskur bólkur/flokkur kann fáa tey tíðindini fram, sum hann vil hava og soleiðis sum hann vil hava tey. Tað er ikki nakað serliga trygt at vita sær! Men rættuliga vandamikið er tað, um borgararnir rokna við, at politiski tíðindaflutningurin er óheftur og "sannur".

Sigast skal eisini, at allar royndir vísa, at prinsippið um ikki at kanna politisk tíðindaskriv, er galdandi fyri allar fjølmiðlarnar. Tað tykist eisini at vera tað einasta prinsippið, sum er galdandi fyri tíðindaflutningin! Tá ein so veit, hvussu stórur partur av tíðindaflutninginum er politisk tíðindaskriv og hvussu ofta tey eru meir ella minni manipulerandi, so hevur borgarin alla grund til at hava tað misálit á tíðindaflutningin, sum kanningar vísa, at hann hevur.

### Í stríð við grundreglur fyri tíðindaflutning

Hetta er fullkomiliga í stríð tær grundreglur, sum eru galdandi fyri seriøsan tíðindaflutning.

Her kann bert verða víst til tær innanhýsis reglur, sum annars eru galdandi hjá fjølmiðlum í Danmark og Grønlandi, har tað verður sagt:

*"Det er mediernes opgave at bringe korrekt og hurtig information. Så langt det er muligt, bør det kontrolleres, om de oplysninger, der gives er korrekte".*

Tað er lætt at staðfesta, at umrødda prinsipp hjá útvarpsstjóranum og annars hjá fjølmiðlunum, sum nú enntá finst í einum almennum skjali, er beint ímóti hesum sjálvsøgdu reglum.

Síðani kunnu vit sammeta niðurstøðuna hjá Løgtingsins Umboðsmanni við ta hjá Hutton dómara.

Her skal fyrst skoytast uppí, at umboðsmaðurin kann taka tað við í síni kanning, sum hann hevur hug til. Hann kundi t.d. tikið sjónvarpstíðindi um hetta mál við, og hesi vóru um møguligt enn meira villleiðandi enn tey hjá útvarpinum.

Umboðsmaðurin hevur blástemplað slíkan tíðindaflutning. Men í hesum førinum gjørdi umboðsmaðurin tað, at hann skar málið júst soleiðis til, at útvarpið, og harvið fjølmiðlarnir sum slíkir, varð fullkomiliga reinsað og hvítvaskað. Samb. honum var als einki grundarlag fyri kæru um slíkan tíðindaflutning, hóast tað kundi prógvast at tíðindini vóru bæði skeiv og at endurgivið var úr tíðindaskrivum, sum vóru totalt misvísandi.

Einum nýtist hvørki at vera útbúgvin løgfrøðingur ella journalistur fyri at kunna meta um ein slíkan tíðindaflutning og eina slíka niðurstøðu.

Tað, sum tó ørkymlar niðurstøðuna hjá umboðsmanninum, er manglandi grundgevingar. Tað kundi verið áhugavert og læruríkt at kent grundgevinginar fyri, at hesin tíðindaflutningur skal vera í fínasta lagi. Harvið kundi kanska fingist ein ábending um, hvat skal til fyri at fáa umboðsmannin at tala at. Men umboðsmaðurin følir seg ikki at hava nakrar skyldur á hesum øki. Tann, sum biður um grundgevingar, skal bert rokna við at fáa tað svar, at ikki skal roknast við at fáa nakað svar yvirhøvur uppá framhaldandi fyrispurningar!

Men henda niðurstøða er so mikið áhugaverd, at hon eigur at verða viðgjørd í serstakari grein.

Umboðsmaðurin hevur í einum øðrum máli staðfest, at bert grundgevingin er "journalistisk metting", so er at siga einki mark fyri tíðindaflutninginum. Úrslitið av hesum gongur eisini sjón fyri søgn.

Hann, sum kom við sannleikanum, fekk svartaper.

Úrslitið av hesi "dómarakanning" gjørdist tískil, at tann sum stóð eftir við frátiknum trúvirði í hesum máli var tann, sum fyrst beinleiðis og síðani óbeinleiðis útvegaði føroyskum fjølmiðlum tey røttu tíðindini um hetta mál.

Hetta kemur sjálvsagt at merkja, at tað við garanti ikki verða fleiri kærur um almennu fjølmiðlarnar til umboðsmannin, sum annars metir hesar sum sítt ábyrgdarøki. Orsøkin fyri hesum er eyðsýnd.

Tí kann fjølmiðlaheimurin ekkaleysur halda festival uttan misljóð.

SELUR TÚ
skipa- ella bátaútgerð?
So er FF-blaðið ein hollur boðberi, sum fer umborð á skipini – umvegis reiðaríini – hvønn útgávudag.
Gerið tí eina skilagóða lýsingaravtalu við okkum
FF blaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Telefon 31 15 69
ff-blad@post.olivant.fo

# Grindadráp í Vestmannaoyggjum



*Her verður rikið sum í Føroyum.*



*Grindin hevur lagt beinini.*

Tað er eingin ivi um, at grindadráp er eitt serføroyskt fyribrigdi.

Men í íslendska blaðnum "Fiskifrettir", sum kom út fyri jól, var ein frásøgn frá einum grindadrápi, sum var í Vestmannaoyggjum í 1958. Talið á dripnum grindahvalum var umleið 200. Frásøgnin í "Fiskifrettir" er sera drúgv og við nógvum myndum og hetta sær ikki so nógv øðrvísi, út enn um drápið hevði verið í Føroyum.

Eitt var at fáa lívið av grindini. Hetta kann hava verið nóg trupult uttan nakran grindareiðskap. Eitt annað var at skera upp. Tað hevur her verið til stóra nyttu, at nógvir føroyingar búðu í Vestmannaoyggjum tá.

Tað verður eisini tikið til í greinini, at her fingu føroyingarnir roynt sín serkunnleika. Sagt verður, at tann, sum skipaði fyri uppskurðinum var ein, sum kallaðist Gøtuskeggi. Hann kendu vit sera væl her á blaðnum. Alfred Gøtuskeggi var ættaður úr Norðragøtu, sonur Bernhard í Tjørnustovu og Gittu undir Liðanum. Hann var giftur við Jenny, dóttir Martin Tausen í Vági, sum var ein kendur skipari.

Alfred var altíð ein rokari. Hann var fiskimaður um ein háls. Hann var við "Mjóvanes" í Amerika undir krígnum, og búði nógv ár í Vestmannaoyggjum, har hann heilt óvæntað slapp í grind fyri 45 árum síðani. Tann, sum kendi Alfred, ivast ikki í, at tað var hann, sum førdi ann!

Alfred dugdi væl at práta – og altíð skuldi hann hava øðrvísi meining enn øll hini. Hann var sera festligur.

Alfred doyði í 1996. Jenny býr í Svøríki, men vitjar javnan heim á klettarnar.

Vit loyva okkum at endurprenta nakrar av myndunum:



*Her verður skorið upp. Teir, sum skera upp, eru uttan iva føroyingar – tað sæst eisini á troyggjunum. Er annar av monnunum Alfred Gøtuskeggi, so er tað hann t.h. Er nakar, sum veit meira um hesa mynd? Annars er stuttligt at síggja eygnabráini á teimum, sum hyggja at. Tað er greitt, at hetta er ikki gerandiskostur!*

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein



Tann 9. februar vóru minus 7,7 stig við einum loti av útnyðringi. Skjótt er, at ísurin kemur, tí "Lómur", sum skuldi landa í Illulissat sunnudagin, slapp ikki inn fyri ísi og mátti tískil suður til Asiaat at landa tey 90 tonsini, teir hava inni.

**10. februar** vóru –6,8 stig og lot av suðri við onkrum kavaæli. "Lómur" kom inn til Sisimiut at bunkra og tóku nakað av trolútgerð umborð. Teir søgdu, at tað var minni at fáa har norðuri nú, og at trolararnir høvdu havt góðan fiskiskap út fyri Sisimiut. "Steffen C" fór í dag út úr Nuuk, har teir hava landað gott 510 tons.

**13. februar:** –6,8 stig og stilli. "Sermersut" kom inn higar at landa. Teir hava verið úti í 11 dagar og fingið fulla last. "Natarnaq" hevur verið inni í Nuuk og landað í vikuni.

**14. februar** vóru minus 11 stig og stilli. "Sattuaq II" kom inn í dag at landa krabbar. Teir hava 40 tons inni av livandi krabba, sum teir hava fiskað í 3½ døgn. Teir hava drigið 2.770 teinar, og tað gevur í miðal 14,3 kg pr. tein. Tað er óførur fiskiskapur, eftirsum at fiskifrøðingarnir siga, at tað er ov lítið til av krabba. "Sattuaq II" roynir suðuri við Ísblinkin og Dana-leiðina. Krabbamenninir hava heitt á politikararnar nú í fleiri ár um at steðga hesum krabbafiskiskapi, tí tað vórðu givin so nógv loyvi at fiska krabba. Tað vóru so at siga teir flestu, sum seldu sína rækjukvotu og brúktu peningin at byrja krabbafiskiskapin afturfyri. Men fiskimenn hava talað fyri deyvum oyrum.

Fyri tíðina er nógv ósemja ímillum fiskimálaráðharran, Simon Olsen, og fiskifrøðingarnar. Tað er krabban, sum kjakast verður um, og fiskifrøðingarnir vilja hava, at krabbakvotan verður ikki hægri enn 3.700 tons, so grundarlag kann vera fyri einum framtíðar krabbafiskiskapi. Men Simon Olsen sigur, at fiskifrøðingarnir eru alt ov varnir við kvotustøddini, og hann meinar, at kvotan skal vera 5-7.000 tons. Til hetta siga fiskifrøðingarnir, at um krabbakvotan verður 5-7.000 tons, so verður grundarlagið fyri krabbafiskiskapi framyvir minkað til 75-90%. Fiskimálaráðharrin hevur sostatt nakað at hugsa um fyri tíðina, men – sum sagt, so er kvotan hvørki viðtikin ella undirskrivað í skrivandi stund.

So kemur nakað, sum eg haldi vera áhugavert: Eg var uppi á ovastalofti herfyri, og tá fann eg ein posa av gomlum "Grønlands Posten", sum eg havi fingið frá vermóðir. Har stendur nógv áhugavert, og harímillum verður skrivað um krabbafiskiskap.

"Grønlands Posten" hósdagin 3. februar 1966 hevur hesa yvirskrift: "Skulu vit byrja uppá krabbafiskiskap?" Rannsóknarskipið "Adolf Jensen" hevur trolað eftir krabba við Godthåb. Teir hava brúkt eitt hummaratrol, og teir byrjaðu við Qorkut, har tað var grunt og bleytur botnur. Har var lítið at fáa – nakrir fáir krabbar og so nakað av svartkalva og kongafiski. So fóru teir at royna sunnan fyri Godthåb á djúpri vatni, og tá bar til, teir fingu okkurt hálið upp í 600 stórar krabbar í ein tíma, og okkurt hálið lá um gott 200 krabbar. Teir størstu krabbarnir spentu um 80 cm millum beinini, so prúðir hava teir verið! Dr. phil. Erik Smidt fortelur, at tá teir byrjaðu at trola eftir rækjum inni á firðunum við Sisimiut, fingu teir nógvan krabba sum hjáveiði, og tá byrjaðu teir eina hermetikframleiðslu, sum eydnaðist væl, men tíverri minkaði krabbin skjótt, so framleiðslan helt uppat av sær sjálvari.

Sami E. Smidt skrivar, at á sumri 1964 gjørdu teir royndir eftir rækjum í Diskovíkini; tað vóru trý skip: "Adolf Jensen", "Dana" og so "Sujumut", sum KGH átti. "Sujumut", sum togaði eftir rækjum, var komin á bleytan botn, og tá trolið kom á borðið, var tað gravskitið av mógvi og fult av krabbum. "Dana" fór so at royna, og teir togaðu ein tíma á 300-320 m, og gav hetta 577 stórar krabbar. So fóru teir at royna djúpari – 360 til 370 m – og tað gav 361 krabbar í ein tíma. "Sujumut" fór so at royna á sama dýpi sum "Dana", 360-370 m, og tað gav gott 200 krabbar. Teir høvdu tvey hál, og teir løgdu til merkis, at yvir helvtin av krabbunum vóru kallkynskrabbar.

Tann **15. februar** vóru –6,8 stig við vindi og kavaælingi, hann er útnyðringur vestan í ættini. "Helene L" kom inn at landa 30,5 tons av livandi krabba. Teir hava drigið 2.399 teinar, og tað gevur 12,7 kg uppá teinin. Teir hava fiskað í 2½ samdøgur, og tað tekur gott eitt samdøgur hjá teimum at sigla til Sisimiut frá Ísblinkinum av, tá veðrið er til vildar.

**17. februar** vóru minus 8,3 stig og stilli inni á, men væl av vindi úti á. Hann er útnyðringur í ættini. "Helene L" bleiv rikin norður til Asiaat at leggja krabban upp. Teir kunnu ikki taka ímóti øllum teimum 70 tonsunum, sum tey bæði skipini hava inni.

Tann **18. februar** vóru –11,5 stig og stilli inni á, men lot av suðri úti á. "Nanok Trawl" kom inn í morgun at landa. Teir hava fulla last – um 470 tons – inni. Tað var ein stuttur túrur, og teir rokna við at sigla til Eysturgrønlands í morgin. Teir hava frætt, at einkultir trolarar hava havt gott fiskarí uppi við Dornbank. "Akamalik" hevur verið inni í Nuuk og landað gott 475 tons, og teir fóru út aftur í dag. Annars verður sagt, at trolararnir, sum eru á vestursíðuni, hava yvirhøvur havt góðan fiskiskap hesa síðstu tíðina. Onkrir trolarar hava fingið gott 200 tons uppá eina viku, og tað er óført fiskarí. "Lómur" var inni í Illulissat í gjár og legði um 80 tons av ísaðum rækjum upp. Teir fóru út aftur í gjárskvøldið.

Nú nærkast, at virkið her í Sisimiut fer at opna aftur fyri avreiðingum av rækjum. Tað sigst, at teir opna aftur tann 27. februar, og so kemur meira lív í havnina hjá okkum aftur. Annars hava jollurnar skotið fleiri hvíthvalir. Tann eina dagin fingu teir 7 hvíthvalir, og tað er nakað, sum pengapungurin veksur av, tí teir selja hvølja fyri 130 kr. kg og tvøstið fyri 40 kr. kg. Annars stóð ein mynd í "Grønlands Posten" herfyri av einum náhvali, teir høvdu skotið uppi í Godhavn. Hann hevði tvær stórar tenn beint fram úr kúluni, og tað er eitt sindur sjáldsamt, at tað kemur fyri. "Louise L" kom inn higar í dag eftir fólki; teir hava verið í Nuuk og sýnað fabrikkina og eru á veg norður í Norðrara Streymfjørðin at royna.

Tann **19. februar** var –9,2 stig og eitt lot av skiftandi ætt. "H. P. Lypert" er ein skeljabátur, sum Royal Greenland hevur átt. Hann er nú seldur til eitt annað reiðarí, og teir komu inn higar í morgun at leggja tað sindrið, teir høvdu inni, upp. Teir fóru úr Nuuk tann 10. februar, har teir hava sýnað verksmiðjuna umborð, og so hava teir roynt norðuryvir; teir fóru norður til Norðrara Streymfjørðin at royna.

"Sermitsiaq" skrivaði tann **20. februar,** at eitt rækjuvirki hjá Royal Greenland koyrdi 9 tons av stórum rækjum fyri bakka, tí virkinum manglaði arbeiðsmegi, og so er virkið alt ov lítið. Tað skal eisini sigast, at tað eru komin fleiri størri rækjuskip til Narssaq, og so er tað rationerað so, at teir liggja inni einar tveir til tríggjar dagar aftaná, at teir hava landað. Tað verður nokk betur, tá virkið í Pamiut opnar í heyst, tí tá kunnu teir fara hagar at landa. Teir hava ein annan møguleika sum nú er, og tað er at sigla norður til Nuuk og landa rækjurnar til Polar Seafood. Ella eisini norður til Sisimiut, nú tá virkið opnar aftur, men sum teir siga har suðuri, er rækjan nógv størri enn norðuri við Sisimiut.



*Tenninar, sum náhvalurin hevur beint fram úr kúluni, kunnu verða heilt upp í 2 metrar langar. Hetta er tó sjáldsamt.*

**Tíðindaskriv frá Fiskimálaráðnum:**

## Samráðingar um fiskiskapin eftir norðurhavssild í 2004

Ísland hevði, eftir áheitan úr ES og Noreg, boðað til samráðingarfundar viðvíkjandi fyrisitingartiltøkum og fiskiskapi eftir norðurhavssild í 2004. Strandarlondini, sum luttaka í hesum samráðingunum, eru umframt Ísland, ES, Føroyar, Noreg og Russland. Fundurin var í Keypmannahavn 16.-17. februar 2004.

Tey 5 strandarlondini samdust um fiskiskapin fyri 1997 og hava síðani fram til 2002 gjørt avtalu fyrst um heildarveiðu og síðani býtt kvotuna við sama býtislykli øll árini – bæði millum londini og við at geva lutfalsliga somu atgongd til skip úr øðrum pørtum at fiska í heimasjógvi.

Semjan helt ikki, tá samráðingarnar fyri fiskiskapin í 2003 vórðu tiknar upp í St. Pætursborg í oktober 2002. Noreg noktaði at halda fram við fimmparta-avtaluni, sum hevur verið grundarlagið undir býtinum av norðurhavssild síðani 1997. Noreg kravdi sín part hækkaðan úr 57% upp í 70% grundað á, at norðurhavssildin mest er í, og verður fiskað í norskum sjógvi – íroknað Jan Mayen og Svalbard. Ongin av hinum pørtunum kundu góðtaka norska kravið og hildu fast við fimmparta-avtaluna. Hetta stríðið endaði so við, at partarnir hvør sær á vári 2003 gjørdu avtalu við Noreg um, at hvør parturin hevði fiskimøguleikar samsvarandi upprunaliga býtinum, men at man samstundis lat Noreg ein part av hesum afturímóti, at Noreg gav fulla atgongd fyri restina av kvotuni at kunna verða fiskað í norskum sjógvi.

Føroyar og ES høvdu avtalað, at útgangsstøðið fyri samráðingunum var lutfalsligur niðurskurður í kvotu hjá báðum pørtum fyri økta atgongd. ICES hevur mælt til, at fiskiskapurin verður samsvarandi hesum veiðusetningi, og at veiðan í 2004 ikki fer upp um 825.000 tons.

Føroyska samráðingarnevndin fór eftir at fáa somu avtalu aftur, sum var galdandi í 1997, og um hetta ikki var møguligt so at finna eina loysn fyri 2004, har virðið av sínámillum avtalu fór at verða samanborið soleiðis, at Føroyar fáa eins stóran ágóða av avtaluni, sum Noreg fær. Í 3 lagi um eingin strandarlandaavtala fekst, so mugu Føroyar seta sær eina egnu kvotu grundað á semjuna í 1996.

Úrslitið gjørdist, at strandarlondini ikki kundu semjast um eina nýggja strandarlandaavtalu, tí Noreg kravdi 65% av heildarveiðuni í mun til 57% eftir avtalunum frá 1997-2002.

Sostatt er eingin sildaavtala enn gjørd fyri 2004.

*18. februar 2004*

**Fiskimálaráðið**

## Tað er eitt undur, at Malmberg livir:

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum**

# Skotin niður av torpedo – og 36 tímar til lands

**Vit hava havt samrøðu við Malmberg Simonsen úr Sørvági, sum hevur upplivað meira enn teir flestu á sjónum. Hann var við "Tór 2", tá trolarin varð niðurskotin av týskari torpedo, og hann var ein av teimum trimum, sum við einum undri slapp frá hendingini við lívinum. Tað er fyrr greitt frá júst hesi hending.**

**Men her er øll søgan samansjóðað í eina eind. Hetta er fyrstu ferð, at ein frásøgn er frá sjólívinum hjá Malmberg sum heild.**

**Vit lata Malmberg, sum nú er 84 ára gamal, sjálvan greiða frá:**



*Malmberg og Herborg Simonsen.*

Pápi var úr Sørvági og kallaðist Mikkjal Pauli Simonsen, og mamma kallaðist Elsa Malena. Hon var úr Gásadali. Abbi, hann var av Henriksens ættini, doyði umborð á einum skipi í Vestmannasundi, og hann varð jarðaður í Vestmanna. Omma var av Hentze-fólkunum í Skopun. Hon kom helst til Sandavágs sum ung, og er síðani endað í Gásadali. Børnini vóru smá, tá ið abbi doyði.

Vit vóru fimm brøður, sum allir vuksu upp í Sørvági. Áhugin hjá okkum øllum var til sjógvin. Longu meðan vit vóru í skúlaaldri, róðu vit út á vágni her í Sørvági – út á Vág, sum tað varð rópt. Har var væl av fiski at fáa. Um 12 ára aldur sluppu vit til útróðrar við teimum gomlu monnunum.

Eg plagdi at hoyggja fyri Billu Mourits. Afturfyri slapp eg á flot við honum. Eitt summarið róði eg út við Lia Hansi, tá havi eg verið okkurt um 13 ára gamal. Tað summarið tjenti eg 72 krónur. Tað varð nógv tá. So nógvur fiskur var, at vit orkaðu ikki at draga undan.

Eg gekk í skúla hjá D. Danielsen, men hugurin var lítil til skúlan. Tað var um ta tíðina, at føroyskt kom í skúlarnar. Jákup av Skarði var eisini lærari tá; men teir samdust ikki so væl báðir. Danielsen var einki fyri tí føroyska.

### Til skips við "Thor"

27. desember 1933 fylti eg 14 ár, so um heystið, sum 13 ára gamal, fór eg at ganga til prest. Eg slapp at ganga til uppá tað, at eg skuldi aftur í skúla. Men um várið vildi eg sleppa til skips. Eg fekk so ein tjans við sluppini "Thor" hjá Søren Nielsen. Tað var við snøri. Thor hevði fingið motor, men eg minnist væl, at eg slapp at gera seglini til. Vit barkaðu seglini heimanfyri handilin hjá Hugo Fjørðoy á Sílatanga. Har stóð ein lýsipottur, sum vit kundu kóka barkið í. Tað var har, at Gamli Dávur hevði fiskahús. Hann bygdi fiskastykki har, og steinarnir síggjast enn.

Gamli Dávur var ættaður úr Kvívík. Hann var fyrsti maðurin, ið hevði egnan bát. Annars vóru tað bert bóndurnir, ið høvdu bát. Tað bleiv ein stór sak burturúr tí. Bóndurnir hildu, at hann hevði forbrotið seg ímóti teimum, tí teir hildu seg hava einarætt til at reka útróður við bátum. Seinni havi eg leitað eftir sakini, men ikki funnið nakað um hana.

Eg fór so við "Thor" í 1936. Vit fóru á Suðurlandið, men vit vóru so óheppnir, at ein íslandstrolari nam við hekkuna á henni – og somikið av roti var í, at hol kom á, so vit noyddust inn í Vestmannaoyggjunum. Haðani gekk leiðin til Reykjavíkar, skipið skuldi á beding, har reyvin bleiv afturgjørd. Tá var eingin pengingur, so tað var torført at sleppa heim. Men einaferð meðan við lógu har, kom "Drotningin". Vit høvdu fingið 10 krónur hvør í lummapeningi, so vit hildu væl til standa.

### Innilæstir í katolikkakirkjuni

Ímillum menninar, sum vóru við, var Eliesar Jacobsen úr Sørvági. Hann er væl kendur frá útróðri í Grønlandi. Vit vóru vinmenn báðir, hóast hann var nógv eldri enn eg. Tá ið vit fóru í land, fylgdust vit altíð. Eg minnist einaferð, vit vóru farnir í land, og Valdemar Simonsen – tvs. abbi tann Valdemar Simonsen, sum í dag er bakari í Sørvági – var komin við okkum. Vit komu framvið katolikkakirkjuni, og Eliesar helt, at vit skuldu fara inn at hyggja at kirkjuni. Valdemar og eg vóru báðir fremmandir, og vit hildu tað vera eitt gott hugskot, so vit fóru inn. Komnir inn, fóru vit ígjøgnum eina hurð, sum førdi okkum upp á loftið. Á vegnum møttu vit einum íslendskum pari, sum var á veg niður av loftinum. Vit hugsaðu sjálvandi ikki um tað, men hildu leiðina fram upp á loftið. Tá ið vit høvdu verið har uppi í eina løtu, fóru vit niður aftur. Men tá ið vit komu til hurðina, var læst. Íslendska parið, sum vit møttu á veg upp á loftið, hevði ivaleyst havt lykil og stongt eftir sær. Nú vóru góð ráð dýr. Eliesar, sum aldri var ráðaleysur, helt fyri, at vit skuldu tveita klokkutoyið, binda um miðjuna á honum og lora hann niður. Tað varð sjálvandi ikki gjørt – men vit vóru so hepnir, at vit



*"Thor". Fyrsta skip sum Malmberg var við.*



*Hetta er Vesturfarið, har tað var um reppið, at teir komu undan í ræðuligum illveðri í 1938, so sum Malmberg greiðir frá. Hendingin er eisini umrødd í Siglingarsøguni hjá Páll J Nolsøe, bind 10. Her verður eisini sagt frá, at fleiri av monnunum komu rættiliga til skaða av brotinum teir fingu. Skiparin Petur á Steig breyt beinið.*

*Vanlagnan fylgdi hesum skipi. Í mars 1942 hvarv hon millum Føroyar og Ísland og við henni fórust 8 mans.*

***Framhald á næstu síðu***



*Tór II.*

funnu eitt sindur av 8 mm snøri ella trolarasnøri, sum vit kallaðu tað. Vit bundu um miðjuna á Eliesari og loraðu hann niður. Okkurt um eina manshædd frá gólvinum, var snørið komið á endanum. Har var ikki annað at gera hjá okkum enn at sleppa, tí ikki varð hugsingur um at fáa hann uppaftur. Eliesar fór trillandi sum ein állakringla inn eftir gólvinum. Har mátti hann so verða, tí hann slapp heldur ikki út haðani. Íslendska parið hevði eisini stongt ta hurðina. Nú varð einki at gera uttan at bíða. Klokkan seks kom ein nunna, og hon gjørdist ikki sørt kløkk av at síggja Eliesar har inni og okkum báðar uppi á loftinum. Farið var síðani til prestin at fáa ein lykil, hann búði beint við. Síðani bleiv latið upp, og vit sluppu útaftur.

Leiðin gekk síðani umborð aftur, men á veg oman helt Valdemar, at hann skuldi keypa ein pylsuenda til viðskera. Viðskeri var eingin umborð uttan smør og sukur. Var avlop frá døgurðanum, varð tað sjálvandi eisini nýtt til viðskera, men tað var ikki altíð, at tað var nakað. At enda kom "Drotningin", kenda ferðamannaskipið hjá DFDS, og vit sluppu við henni heim til Føroya. "Drotningin" legði inn á Sørvág, og síðani komu smáir motorbátar eftir okkum. Glaðir vóru vit, tá ið vit komu heim.

Sørin var farin yvir til Íslands, hann hevði verið sjúkur tað várið, og Palli Joensen, úr Kollafirði, hevði ført "Thor". Tummas hjá Juliusi hevði eisini verið sjúkur. Hann skuldi umborð á "Havfarið", men hann fylgdist við okkum allan vegin og kom tískil ongantíð umborð á "Havfarið".

Fiskiskapurin var stak vánaligur tað árið. Vit fingu ongantíð meir enn tær 10 krónurnar, sum vit høvdu fingið í lummapeningi í Íslandi.

### Til Bjarnoynna

"Thor" kom heimaftur um ólavsøku, og síðani varð riggað til næsta túr. Meiningin var at fara til Grønlands, men vit hálsaðu um og fóru til Bjarnoynna, ella Svalbard, við snøri. Tað var í 1936. Tann túrurin lukkaðist ikki so væl hjá okkum, men summi skip fingu nógvan fisk. Hvør orsøkin var til, at tað gekk so illa hjá okkum, tað veit eg ikki. Leiðin gekk síðani heimaftur. Onkur av sluppunum máttu inn í Noregi, men tað nýttist ikki hjá okkum. Vit høvdu nóg mikið av provianti og tí, sum skuldi nýtast til heimferðina.

Í 1937 var eg eisini við "Thor", tá var ein klaksvíkingur skipari.

### Ræðuligt veður

Í 1938 fór eg við "Vesturfarinum", sum Petur á Steig førdi. Meiningin var, at eg skuldi fara við "Thor", men av tí, at Jóhannes úr Sørvági, systkinabarn mítt, hevði fingið kjans sum maskinmaður við "Research", fór eg við "Vesturfarinum".

Vit fóru so yvir á Suðurlandið. Vit fóru tíðliga, og tað gjørdist eitt so ræðuligt veður, at hetta varð eitt minniligt vár. Í fyrra óveðrinum vóru vit á Selvogsbankanum, og har komu vit út fyri, at vit fingu ein sjógv. Johan á Mýruni var bestimaður og Petur á Steig var skipari. Teir báðir vóru í stýrihúsinum saman við Alberti úr Miðvági, tá vit fingu hendan sjógvin. Johan á Mýruni segði, at hetta var ikki ein vanligur sjógvur – hetta var eitt grunnbrot, sum vit fingu. Tað legði yvir mastrartopparnar, og skolaði alt burtur: Segl, lugarskappin, stýrihúsið og lastalúkan, tað fór alt. Men vit fingu so segl útyvir lúkurnar, og samstundis fóru seks mans niður í lastina at lempa salt í eina krubbu aftureftir, fyri at fáa skipið afturá. Tað var annars gjørt klárt til at koyra fisk í krubburnar, men tað bleiv so ikki.

Teir stúvaðu skottfjalir uppundir, so hvørt tað brotnaði niður ígjøgnum. Teir sluppu ikki upp aftur, tí alt var neglt útyvir. Tað varð neglt útyvir lugarskappan eisini, so her slapst heldur ikki niður. Vit blivu so tríggir, sum um kvøldið fóru til pumpurnar. Vit vóru eg, Niels Jacob og Karl Joensen.

Vit stóðu líka til kl. 8 um morgunin, tá var hon tóm fyri sjógv. Tað var eitt langt pumputørn. Allir vóru upptiknir, tí menninir, sum stóðu í stýrihusinum, vóru so illa farnir. Teir fingu hvørki sitið ella ligið. Um morgunin, í tí tað lýsti, sóu teir, at vit róku á Einars drang. Einki segl var uppi – tað var alt slitnað niður. Fokkufallið, t.v.s. línan til fokkuna, sum var fremsta segl, var slitnað. So mátti nýtt fokkufalli skerast í aftur. Spurningurin var, hvør skuldi fara upp. Tað, sum stakið hekk á, var brotnað niður. Stakið var so leyst, og masturin livdi so nógv, at tað var næstan ómøguligt at fara upp. Men so var tað ein maður úr Sørvági, hann kallaðist Hans Martin. Hann segði, at hann skuldi fara upp. Hann fór upp, og var so mikið skilagóður, at hann tók ein lissuenda og bant um miðjuna á sær. Hann hevði ein stubba frammanfyri sær, so hvørja ferð skipið rullaði á lu, so vavdi hann endan um seg, og so hekk hann í hesum endanum. Hann fór tvær ferðir upp. Fyrru ferð kvettist fallið av aftur, men seinnu ferð helt, og vit fingu hetta í rættlag.

Vit komu so inn til havnina í Vestmannaoyggjunum, men sluppu ikki til bryggju. Menninir blivu sostatt førdir í land í einum báti. Men tá tað leið út móti kvøldi, komu teir út aftur, og vit sluppu inn. Glaðir vóru vit, tá vit vóru í havn. Tá var veðrið batnað.

### Samanbrestur við "Fossanes"

Eg veit ikki, um tað var blivið myrkt um kvøldið, tá herjaði á aftur. Hetta var faktiskt tað verra veðrið. Tað var ikki meira enn ein løta millum bæði veðrini. Tá tað seinna veðrið var av, tá kom ein Fleetwood-trolari inn. Pápi Karl hevði ofta eingilskmenn at fiska síl. Teir gistu hjá honum, og so fiskaðu teir síl á vatninum, so Karl dugdi eitt sindur av enskum. Har kom ein ungur maður og segði honum, at "Fossanes" var farin. Teir høvdu havt samanbrest við "Fossanes". Øll lúnningin millum gálgarnar lá á dekkinum. "Fossanes" var horvin og einki spurdist aftur. "Fossanes" hevði telefon, og teir skuldu tosa kl. 6 um kvøldið. Øll vóru so spent at hoyra, hvat hon segði, men hon kom ongantíð fram. Skipini, sum høvdu telefon, róptu øll. Tað vóru serliga garnaskipini. Hon var farin við gørnum um várið, og okkurt annað skip var har yviri eisini.

Men fyri at koma aftur til hetta grunnbrotið, sum vit fingu: Eg havi hoyrt, at nú teir hava hesi góðu tólini, hava teir funnið ein tind á Selvogsbankanum, sum stingur so høgt upp. Vit eru helst komnir yvir tann tindin. Tað eru mong skip, sum eru komin yvir tað økið, sum hava fingið dyggar stoytir av tí.

Tá so summarið kom, fór eg yvir til Grønlands við "Vesturfarinum".

Men tað vísti seg, at her var ikki eydnan við, soleiðis sum hon plagdi at vera. Stýrihúsið var farið í umrødda illveðrinum, so nú var einki stýrihús. Petur á Steig førdi skipið, og hann var faktisk so íðin, at hann ætlaði sær avstað aftur við skipinum, hóast tann ringa túrin frammanundan. Men hann var ikki tann sami Petur, sum hann hevði verið. Vit fingu ikki so nógvan fisk, sum vit høvdu fingið frammanundan. Vit landaðu eitt sindur til damparar, men so varð farið heim.

Á heimferðini var lítið gott at fáa. Vit fingu ein margarinpakka í part – tað var tað, sum vit fingu í einar 14 dagar. Afturat tí var nakað av keksi, eitt sindur av mjólk og okkurt var tó til døgurða.

Men so ein seinnapart, fór ein at lokka havhest. Tá var vindurin blivin so nógvur. Tað varð lagt bakk, og hesin lokkaði ein havhest í part. Vit vóru 31 mans, og so bleiv skrællað og koyrt í grýtuna. Tá kókað varð, fekk hvør maður sín havhest. So helt hesin, sum hevði lokkað, skrællað og kókað, at tað var best at royna soðið. Tað bleiv javnað eitt sindur av mjøli útá. Hetta varð ein so góð máltíð, sum vit ikki høvdu fingið á túrinum. Vit komu so heim í øllum góðum.

### Setti pening í "Tór 2"

Í 1939, fyrst í árinum, vóru teir í ferð við at tekna partapening til "Tór 2". Tað var Jens av Reyni í Havn, sum stóð fyri tí arbeiðinum. Fakta var tað, at so góðan hug, eg hevði á snørinum, eins góðan hug hevði eg at sleppa burtur úr tí – og her var ein kjansur at seta eina "aktiu" í fyri at sleppa við trolara. Men pengar vóru eingir, so okkurt mátti gerast. Tá eingin inntøka var, so vóru eingir pengar. Tá helt elsti beiggi mín, Mourits, fyri, at hann skuldi fara til D. Danielsen, tann kendi læraran og sambandsmannin, at læna mær fyri aktiuna; so kundi hann fáa tað aftur, tá avrokningin kom. Hann lat hesar pengarnar uppá blankt andlit. D.D. var óførur soleiðis. Hann lænti pengar til fleiri. Soleiðis fekk eg eitt partabræv í Tórfelagnum. Eg haldi, at "aktian" var kr. 500. Hetta var tætt við eini ársinntøku hjá fiskimanni tá í tíðini, og henda upphædd var eisini stórur partur av ársløn hjá lærara.

Eg fór so við "Tór 2". Tá

## Jesunavnið aldri bliknar...

*Jesunavnið aldri bliknar,*
*slítist ei av tíðar tonn,*
*Jesunavnið aldri viknar,*
*Guds orð eru ævigt sonn.*
*Tað ber boð til ung og gomul,*
*gevur lív og frið í sál,*
*og tað savna kann øll somul,*
*leiðir sálir fram á mál.*

*Eg má elska Jesunavnið;*
*frelsu, frið í tí eg fann,*
*andans eld fekk í hans favni.*
*Eingin frelsir uttan hann!*

*Jesunavnið vakurt ljóðar,*
*lat tað ljóma her á fold!*
*Hann ta stóru gávu bjóðar,*
*sælan frið til óreint hold.*
*Óndskapur tað navn má skýggja,*
*lygn og hatur flýggja má.*
*Jesu navn vil rættferð síggja,*
*tað Guds ríki bygt er á.*

*Í tí myrku nátt áminnir*
*sum ein viti Jesu navn,*
*og hvør hjálparleysur finnur*
*inn í tryggu himmalhavn.*
*Og tá sólin meir ei skínur,*
*lýsir Jesu navn á nátt,*
*og hin frelsti flokkur trínur*
*fyri Gud og syngur hátt.*

***(A. Petersen týddi)***

Petur Háberg greiðir í síni bók "Søgur um Sangir", sum kom út í 1979, frá søguni, um tá hesin sangur varð sungin umborð á "Tór 2", beint áðrenn skipið varð torpederað.

Søguna hevur Petur fingið frá Malmberg. Petur arbeiddi nevniliga á skrivstovuni hjá Tór-reiðaríinum, og Petur og Malmberg vóru væl alla tíð, og teir prátaðu ofta saman.

Um sangin skrivar Petur annars, at hann er yrktur av David Welander, sum var norðmaður. Hann livdi frá 1896 til 1969. Sangurin er skrivaður í 1922.

***Framhald á síðu 15***

### Kreppa hjá donskum fiskimonnum:

# Felagið hjá teimum uppsigur størra partin av starvsfólkunum

**Meðan tað má sigast at hava gingist hampiliga væl hjá føroyska fiskiflotanum seinnu árini, hóast afturstig í 2003, so hevur verið áhaldandi kreppa í donsku fiskivinnuni í fleiri ár. Hetta sást ikki minst í 2003, tá veiðivirðið fall frá 3,8 milliardum í 2002 til 2,8 mia í 2003.**

Hendan kreppan hevur eisini merkt virksemið hjá Danmarks Fiskeriforening, sum er meginfelagið hjá donskum fiskimonnum. Hetta felag er skipað eins og Meginfelag Útróðrarmanna, sum er felag av bæði manning og teimum, sum eiga bátarnar.

Danmarks Fiskeriforening hevur 75 lokal feløg kring Danmark, og samlaða limatalið er um 3.500, sum eru bæði fiskimenn og bátar. Felagið hevur eitt – eftir støddini – sera umfatandi virksemi, og tí eru eru heili 35 fólk, sum hava havt starv her. Millum hesi er manningin á blaðnum Fiskeritidende, sum kemur út einaferð um vikuna, og sum er eitt gott fiskivinnublað. Annars hava teir eisini fiskifrøðingar í starvi og t.d. umhvørvisserfrøðingar, so felagið hevur verið væl fyri at grundgeva fyri sínum sjónarmiðum.




*Danski fiskiflotin spennir sera vítt. Nú um dagar fingu teir størsta fiskiskip í Danmark, sum er 57 metur langt. Tað er bygt í 1995 og hevur hoyrt heima í Hetlandi. Tað tekur 1400 t. av ídnaðarfiski. Og kostnaðurin er 92 mill.*

Men nú eru seglini repaði, so tað munar. Av hesum 35 starvsfólkum eru 21 uppsøgd. Tað sá nevniliga so svart út, at varð hetta ikki gjørt, vóru útlit fyri einum halli uppá 4 mill. í 2004. Nú vóna teir at fáa javnvág í roknskapin í 2005. Roynt verður tó at útvega teimum uppsøgdu arbeiði aðrastaðni við somu uppgávum, so vitanin framvegis skal vera tøk.

Umsitingin hjá felagnum hevur higartil ligið bæði í Keypmannahavn og í Esbjerg. At hon eisini liggur í Esbjerg hevur sína søgu. Í 1934 kom klovningur í tað, sum tá kallaðist Dansk Fiskeriforening. Tað vóru fiskimenn á vesturstondini, sum fóru úr og stovnaðu Vestjydsk Fiskeriforening, sum seinni broytti navn til Danmarks Havfiskeriforening vísandi til, at tað var hetta felag, sum umboðaði tey stóru skipini. Høvuðssætið hjá hesum felag var í Esbjerg. Men danskir fiskimenn ásannaðu, at skuldu teir hava nakra ávirkan, máttu teir arbeiða saman, og feløgini vórðu samanløgd aftur, soleiðis at umsitingin í Esbjerg skuldi halda fram. Men nú verður skrivstovan í Esbjerg niðurløgd eftir 70 ár. Hetta verður tó ikki roknað fyri at vera meir enn ein ímyndarlig vanlukka. Eitt av stóru lokalfeløgunum er Esbjerg Fiskeriforening, og teir hava ta umsiting, sum tørvur er á í Esbjerg.

Skrivstovan í Keypmannahavn verður eisini minkað munandi. Virksemið hjá Danmarks Fiskeriforenng verður flutt til Koldingleiðina í Jútlandi, har Producentfelagið longu er. Hetta er tann felagsskapur, sum umsitur minstaprísskipanina hjá ES, og har eisini allir fiskimenn eru limir.

Annars er Danmarks Fiskeriforening nógv merkt av rembingum. Felagið umboðar, ella hevur umboðað, allar veiðubólkar – heilt frá nótaskipum og til jollur. Royndirnar vísa, at tað ber ofta illa til at gera hesum báðar bólkar nøgdar í senn. Nakað herfyri vóru tað tey størru skipini, sum hildu seg vera fyri vanbýti. Hetta skapaði slíka órógv í felagnum, at formaðurin gjøgnum 10 ár, Bent Rulle, legði frá sær og Thorkild Førby varð valdur í hansara stað.

Beint nú eru tað teir smáu bátarnir, sum føla seg vera fyri vanbýti, so tað er ikki lætt at gera við.

Politiskt hava teir bert eina loysn fyri kreppuni, og tað er stuðul til upphøgging fyri at minka flotan. Hetta hevur merkt, at danski fiskiflotin longu nú er bert ein brotspartur av tí, hann hevur verið, og loysnin í verandi kreppu er framvegis meira upphøgging og ein enn størri minking av danska flotanum, so her verður minni og minni eftir.

Hetta hevur nú eisini ført til skerjing av meginfelagnum hjá donskum fiskimonnum.



*Í Norðurjyllandi hava teir onga havn og draga bátarnar uppá sandin hvørt kvøld. Her á Thorup Strand.*



*Allir bátarnir eru afturkomnir og er tryggari enn í nøkrum bátahyli!*

**Tíðindi úr Canada:**

# Eingin bati hjá fiskimonnum

**Seinasta heyst høvdu vit eina frásøgn frá vitjan hjá Fiskimannafelagnum á vesturstrondini í Canada. Vit vitjaðu fiskivinnubýin Prince Rupert, nærindis markinum til Alaska, har vit hittu Des Nobels, ein av álitismonnunum hjá fiskimonnum har á leiðum.**



*Her fer feskur laksur til fiskamjølsframleiðslu í Canada. Tað sigur nakað um kreppuna, sum hevur rakt canadiskar og eisini amerikanskar fiskimenn vegna lága prísin.*



*Des Nobels, álitismaður hjá fiskimonnum, letur illa at canadiska fiskivinnupolitikkinum.*

Hann lat sera illa at støðuni. Fiskivinnan á leiðini hevur í fleri ár verið fallandi, og her hendir tað sama sum í Føroyum, tá vit eisini høvdu okkara stóru kreppu: Fólkatalið minkar!

Ein orsøk fyri gongdini var tann, at fiskivinnuumsitingin liggur í høvuðsstaðnum inni í landinum, og har hava tey onga kenslu av, hvat ið ber til og hvat ið ikki ber til, tá tað ræður um fiskiskap.Tí verður fiskivinnan kvald í umsiting og ósmidligum reglum.

Vit hava havt samband okkara millum síðani hesa vitjan, og herfyri frættu vit aftur frá Des Nobels. Men tað eru ikki góð tíðindi, hann hevur at bera. Støðan er stórt sæð enn eins ring og tá vit hittust, og orsøkirnar eru tær somu.

Vit hava eisini fingið sendandi blaðið hjá teimum "The Fisherman". Her sæst, at í summum førum hava vit somu áhugamál og trupulleikar, og í øðrum førum er tað beint øvut.

### Somu trupulleikar í rækjuvinnuni

Millum annað hava teir somu trupulleikar sum vit í rækjuvinnuni, og sagt verður í eini grein, at nógv rækjuskip liggja, vegna teir lágu prísirnar. Av 245 skipum og bátum við rækjuloyvi, eru bert 82, sum hava landað í farnu sesong. Sum dømi um niðurgondina verður nevnt, at í 1999 vóru 180 før, sum vóru virkin í hesi veiðu. Talið á virknum bátum er farið niður í minni enn eina helvt.


## Roknskapurin 2003

### Rakstrarúrslit

| DKK 1.000 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 309.561 | 336.170 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 63.416 | 93.056 |
| **Rentuinntøkur netto** | **246.145** | **243.114** |
| Vinningur av partabrøvum | 291 | 183 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 18.512 | 16.497 |
| Útreiðslur til kostnað og provisiónir | 1.041 | 1.030 |
| **Rentu- og kostnaðarinntøkur netto** | **263.907** | **258.765** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 5.483 | 33.436 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 16.164 | 11.839 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **274.888** | **304.039** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 117.942 | 121.812 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 921 | 4.905 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 79 | 0 |
| Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto) | 109.630 | -1.399 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 970 | 3.050 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **47.286** | **181.740** |
| Skattur | 9.302 | 35.511 |
| **Ársúrslit** | **37.984** | **146.230** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 37.984 | 146.230 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 1.388.900 | 1.318.720 |
| **Tøkar** | **1.426.884** | **1.464.950** |
| Nýtt til vinningsbýti | 20.000 | 73.000 |
| Javnan av grunni til nettouppskriving til innara virði | 970 | 3.050 |
| Framflutt úrslit | 1.405.913 | 1.388.900 |
| **Tilsamans** | **1.426.884** | **1.464.950** |

### Fíggjarstøða 31. desember

| DKK 1.000 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 181.947 | 91.681 |
| Ogn hjá kreditstovnum o.a. | 118.702 | 235.882 |
| Útlán | 3.511.795 | 3.412.238 |
| Lánsbrøv o.a. | 1.367.758 | 1.566.919 |
| Partabrøv o.a. | 4.958 | 2.422 |
| Kapitalpartar í leysknýttum fyritøkum | 3.677 | 4.330 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 116.305 | 114.416 |
| Ítøkiligar ognir | 68.803 | 52.818 |
| Egnir kapitalpartar | 0 | 0 |
| Aðrar ognir | 31.047 | 39.394 |
| Tíðaravmarkingar | 4.833 | 4.640 |
| **Ognir tilsamans** | **5.408.124** | **5.524.519** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til kreditstovnar og tjóðbankar | 57.301 | 89.192 |
| Innlán | 3.779.942 | 3.832.449 |
| Onnur skuld | 56.926 | 105.233 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 17 |
| Avsetingar til skyldur | 4.043 | 5.500 |
| **Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 100.000 | 100.000 |
| Grunnar | 4.198 | 3.228 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 1.388.900 | 1.318.720 |
| Flutt frá ársúrsliti | 17.014 | 70.180 |
| Eginpeningur tilsamans | 1.510.111 | 1.492.127 |
| **Skuld tilsamans** | **5.408.124** | **5.524.519** |
| **Tøl, sum ikki eru tikin við í javnan** | | |
| Ábyrgdir o.a. | 144.191 | 187.541 |
| Aðrar skyldur | 30.250 | 37.162 |
| **Tilsamans** | **174.441** | **224.703** |

***Vinningsbýtið fyri 2003, 20%, verður útgoldið tann 1. apríl 2004***

FØROYA BANKI

Annars eru tað mest bummtrolarar, sum veiða rækjur. Hesir er 70% meðan lemmatrolarar eru 30%.

Minkandi talið av bátum í vinnuni hevur eisini eina aðra avleiðing. Tað skal gjaldast ein upphædd fyri fiskiloyvi, sum skal svara til útreiðslurnar av almennu umsitingini av veiðuni. Færri bátarnir verða í vinnu, tess færri verða teir eisini um at gjalda samlaðu upphæddina. Tí fór gjaldið fyrst úr $1.000 upp á $1.500, og roknast kann nú við,at tað fer upp á $2.000, og tað kann – um illa vil til – fara heilt uppá $4.600, so her er talan um eina ónda ringrás, sum bert kann gera støðuna verri hjá teimum, sum eru eftir.

Keyparar av rækjum vilja nú gjalda eina upphædd pr. kg. í ein grunn, sum skal nýtast til at hjálpa uppá hendan trupulleikan.

### Ikki somu áhugamál í laksinum

Hinvegin kann sigast, at vit sum samfelag hava heilt onnur áhugamál enn canadiskir fiskimenn, tá tað snýr seg um laks.

Veiða av laksi man vera eitt høvuðsgrundarlag fyri fiskimenn fram við Kyrrahavsstrondina í Amerika. Her hava teir eisini kent sviðan av teimum lækkandi laksaprísunum, sum eisini hava rakt villan laks. Sum vit greiddu frá í okkara frásøgn frá fiskivinnuni í Canada seinasta heyst, er støðan so vánalig, at laksur av besta slagi í summum førum verður malin til fiskamjøl. Við góðari grund geva hesir fiskimenn teirri nógv øktu alingini skuldina fyri hesa støðu.

Fiskimenn hava so bert ein møguleika og tað er at vísa á, at villur laskur er betri og sunnari enn tann aldi. Á henda hátt vilja teir hava forbrúkaran at taka tann villa laksin framum, og kanska eisini at gjalda meir fyri hann. Ein háttur er, at fáa matstovur at lýsa við, at tær borðreiða bert við villum laksi; hetta verður eisini gjørt.

Teir hava tískil gjørt ein faldara, hvørs høvuðsboðskapur er, at "aldur laksur er vandamikil", tí hann er fullur av "øllum lorti" mótsatt tí villa laksinum. Teir hava enntá fingið sær eina heimasíðu, sum eitur www.farmedanddangerous.org, "aldur og vandamikil" har sjónarmiðini verða útgreinað.

Herfyri kom fram ein vísindalig frágreiðing í USA um, hvussu vandamikil aldur laksur er.




*Høvdið á The Fisherman.*

Henda frágreiðing, sum hevur verið nógv umrødd í fjølmiðlunum, kom illa við hjá okkum, men hjá fiskimonnum vestantil í Canada, og í Amerika annars, kom hon sum ein gáva frá himli. Tí er tað ikki so løgið, at "The Fisherman" ger nógv burtur úr hesi frágreiðing. Teir siga, at hon váttar tað, sum teir sjálvir hava sagt í áravís um hetta evnið.

Tað er helst skeivt hjá okkum at stinga høvdið í buskin.Tað má gerast nakað veruligt, fyri at minka um tey heilsuskaðiligu evni, sum finnast í laksi, um tað so bert er í smáum nøgdum. Hesin spurningur var eisini uppi og vendi á Ráðstevnuni hjá Rubin, sum var umrødd í seinasta blað, og ein av fyrilestrunum snúði seg um hvussu tað bar til at reinsa fóðrið, so innihaldið í laksinum av slíkum evnum kundi minka.

Hóast ymisk áhugamál í ávísum førum, so vilja vit ynskja canadiskum fiskimonnum, at teir skulu koma burtur úr teirra kreppu, og vit vænta at frætta frá teimum, hvussu tað gongst.




*Hetta er forsíðan á faldaranum við boðskapinum um, at aldur laksur er vandamikil.*



FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



# Nú er Jakku eisini farin

Tað blivu bert 6 vikur millum beiggjarnar Ismar og Jakku. Báðir komu at vera á Vesturstovu teirra seinastu ár, og báðir mynstraðu av í senn.

Jakku var ein álitismaður hjá verkamanninum um ein háls. Sum so nógvir fór hann til skips blaðungur, og hann sigldi fram til 1962, tá hann var við "Sporinum" úr Gøtu.

Jakku var sóknarformaður hjá FF í fleiri skeið, og í 14 ár var hann formaður í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag. Hann umboðaði eisini hetta felag í Havsild, sum var upprunafelagið til Havsbrún. Í sínum størvum var Jakku ein skilamaður, sum hóvliga arbeiddi fyri síni søk.

Jakku giftist við Mariu, sum eisini var úr Fuglafirði, og sum bert gjørdist 63 ára gomul. Tey áttu sonin Magna.

Friður verið við minninum um Jakku.



*Hendan myndin av teimum fýra beiggjunum varð tikin í 2001. Teir eru frá vinstru Ismar, Jakku, Sidonus og Julius. Sidonus er 90 ár og Julius er 93 ár.*

UMBOÐSRÁÐSVAL 2004



Verið við at velja

Í ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna

INNKOMIN VALEVNI ERU HESI:
Árni Jakobsen, Sneragøta 19, Tórshavn
Atli Hansen, Norðragøta
Birgir Waag Høgnesen, Vestmanna
Brynhild í Jákupsstovu, Tvørgøta 9, Tórshavn
Djóni Zieka, Millum Gilja 7, Hoyvík
Emil Jacobsen, Sidla
Elin Heðinsdóttir Joensen, Hoyvíksv. 22a, Tórshavn
Erling Dalsgaard, Bakkgøta 11, Tórshavn
Heini Lützen, Kristinargøta 23, Hoyvík
Hannus Winther, Skopun
Hervør Hesgadóttir, Eiðum
Ingeborg Gaddfred, Garðsgøta 21, Argir
Jákup Egholm Hansen, Sandavágur
Jógvan Durhuus, Vestmanna
Jógvan L. Rasmussen, á Frælsinum 8, Tórshavn
Jóhan Mortensen, Spógvavegur 57, Tórshavn
Jens Ulrikka Nielsen, Undir Fossum 44, Klaksvík
Klæmint Olsen, Varðagøta 14, Tórshavn
Marin í Dali, Tórsbyrgi 10, Tórshavn
Poul Johannes Joensen, Vágur
Regin Hammer, Hanusargøta 7, Tórshavn
Rói Egholm, Hagagøta 6, Argir
Ronald Poulsen, Tuririðargøta 27, Tórshavn
Sámi Winther, Hvarvið 1, Tórshavn
Tummas Jacobsen, Spógvavegur 6, Tórshavn

ATKVØÐURÆTTUR
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í felagnum síðani 1. januar 2004.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn kr. 50.000,- hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar kr. 50.000,- í árligum tryggingargjaldi harumframt, fær limurin 1 atkvøðu upp til í alt 10 atkvøður.

Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST
Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast frá 18. februar 2004 til og við 2. mars 2004 á øllum deildum felagsins. Atkvøðuseðil kann umbiðjast persónliga ella við at ringja til tel 345400, senda fax til 345401 ella teldupost til tf@trygging.fo.

Neyðugt er, at viðskiftafólk, ið persónliga biðja um atkvøðuseðil á deildum felagsins, hava samleikaprógv við sær. Verður atkvøðuseðil umbiðin um tel, fax ella teldupost, er neyðugt at upplýsa um navn/navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin inn aftur á Havnarskrivstovu felagsins, í seinasta lagi mánadagin 8. mars.

VALÚRSLIT
Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í fjølmiðlunum.

Tórshavn, 18. februar 2004
Stjórnin

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Tryggingarhúsið · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel. 345400 · Fax 345401 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

## Góð byrjan og ringur endi hjá Johan Dahl

Í seinasta blað kundu vit boða frá, at Johan Dahl út frá okkara sjónarmiði hevði fingið eina góða byrjan sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Tann góða byrjanin var, at hann ein av teimum fyrstu døgunum í starvinum hevði sett seg í samband við Fiskimannafelagið, har lunnar vórðu lagdir undir eitt gott samstarv.

At Johan vildi nakað sæst eisini av grein her í blaðnum, har hann – effektivur sum hann í hvussu er hevur orð fyri at vera – hevur tikið ítøkilig stig fyri at kanna, um møguleikar eru fyri at varðveita rækjuflotan.

Men endin var ringur, og tað er ikki nógv, sum skal sigast um hetta beint nú. Vit vilja í hvussu er takka Johan fyri góðan vilja.

Síðan vilja vit ynskja Bjørn Kalsø vælkomnan í starvið, og okkara tilboð um samstarv við Johan Dahl er eisini galdandi fyri hann.

Lærdir av royndum kunnu vit siga, at tað hevur alstóran týdning fyri ein landsstýrismann á hesum øki, at hann hevur eitt neyvt samband við partarnar í fiskivinnuni. Hetta er ikki minst galdani, um ein ikki frammanundan er meinkunnugur innan økið. Fiskivinnan kann ljóða sum eitt einfalt orð. Men hon er nógv meira kompliserað, enn ein vanliga hugsar um. Her verður nógv at taka støðu til, og tí ræður um, at øll sjónarmið eru á borðinum. Tað er eingin skomm hjá landsstýrismanni ar lurta eftir vinnuni. Tað munnu vera fleiri dømi um, at júst hon, íroknað FF, er komin við loysnum á stórmálum.

Nýggi landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, kemur úr Syðradali á Kalsoynni; eini av landsins minstu bygdum, har sjógvurin hevur verið grundarlagið í øldir, sum tað eisini sæst á minnisvarðanum í bygdini.

Hann er sonur Sólmay og Stefan Kalsø. Stefan var ættaður av Húsum, meðan Sólmay var dóttir ta gomlu jarðamóðrina Konstansu, f. Isaksen, í fyrru giftu. Hon giftist aftur við Óla Joensen, sum datt oman á fjalli í 1949.

Hetta er onnur setan hjá Bjørn sum bygdaráðsformanni í Húsa sókn, sum eftir støddini er ein væl rikin kommuna. Tað besta dømið um hetta eru skúlaviðurskiftini. Kanska kundi Bjørn verið upplagdur at hava útjaðaran sum málsøki aftrat fiskivinnu.

Okkara keldur í Kalsoynni bera Bjørn, at hann er ein skilamaður. Hetta munnu veljarar í Norðoyggjum eisini halda! Annars hevur hann tað til felags við Johan Dahl, at báðir eru ættaðir frá Harra Klæmint. Men tað er ein onnur søga.

várið kom í 1939, fóru vit yvir á Suðurlandið á saltfiskaveiðu. Jákup á Trøðni var skipari. Tá kolið var uppi, høvdu vit eini 50 tons av fiski inni. Vit máttu so fara heim aftur, og so varð gjørt til at fara til Bjarnoynna. Ein, sum kallaðist fyri Hans Edvard Olsen av Argjaboða, var stýrimaður. Eitt vælsignað fólk; hann var so góður við okkum ungu. Hann hevði siglt við eingilskmonnum, og hann hevði verið yviri í Norra eisini. Í 1938 haldi eg tað var, at hann sigldi við norðmonnum. Vit bunkraðu í Tromsø, men tann seinna túrin brast 2. heimsbardagi á.

Vit vóru tó heimkomnir, áðrenn bardagin brast á í september 1939. Tá var komið so langt út á heystið. Báturin fór so til ísfisk, men tá var eg ikki við. Tað skuldu vera færri mans við á ísfiskaveiðu. Teir vóru einir 30 á saltisk og 21 á ísfisk. Men so í 1941 var eg við. Vit fiskaðu undir Íslandi og seldu í Bretlandi.

### Lagnutúrurin

Í 1942 fóru vit avstað aftur, og vit lógu í Kollafirði. Tá kvøldið kom, fóru vit heim á Stykkið, Karl svágur og eg. Vit fóru so av Stykkinum aftur og oman til Kollafjarðar og umborð. Men tá sigur Karl: "Malmberg, tú kemur at liva, og eg komi at doyggja". "Tvætl", sigi eg. Hann hevur haft okkurt ánilsi, tí hann segði hetta við meg aftur seinni. Men sum tað hevur sæst við øðrum slíkum frásagnum, kundi hetta ikki steðga honum. Vit fóru so tann túrin, og hann gekk væl. Vit seldu í Fleetwood, lógu nokk einar tveir dagar har, og so fóru vit avstað aftur. Kósin varð sett beinleiðis úr Fleetwood og upp til Vestmannaoyggjarnar uppá at fara nýggjan túr.

Tá vit vóru 80 fjórðingar úr Vestmannaoyggjunum hendi tað. Tað hevur verið um kaffitíðina ella so. Eg hevði frívakt og hevði fingið mær kaffi. Nú hyggi eg aftur eftir, tí undir krígnum var líka umráðandi við skipi at hyggja aftureftir, sum at hyggja frameftir, tí vandin kundi vera báðumegin. Eg hugdi aftureftir og sá tornið á hesum kavbátinum. Helt, at eg skuldi fara upp á brúnna. Eg lænti kikaran og kikaði. Jú, tað var ein kavbátur. Eg segði so frá tí, eg sá. Men so fór eg fram í lugarið, og har vóru menn staddir.

Tað kann ein og hvør ímynda sær, at tað hevur ikki verið stuttligt at bíða eftir deyðanum. Ein kann faktisk siga tað so, at vit bíðaðu eftir deyðanum. Vit vistu, hvat ið kundi henda. Hetta var nevniliga ein kavbátur, sum jagstraði okkum. Tað kendist ein slík órógv á monnum. Men eg tørnaði kortini inn og sovnaði. So tá tað var gingin ein tíð, tað munnu hava verið einir tveir tímar, so hoyrdu vit nakað. Tað ljóðaði sum ein motorur. Tá var tað ein torpedo, sum varð skotin eftir okkum. Hon rakti ikki og fór framvið.

Ein rotta var umborð. Hon man eisini hava følt sær okkurt, tí nú kom hon knappliga í lugarið og rann millum beinini á monnunum. Men hon fekk frið.

Av monnunum minnist eg Rasmus Joensen, ein eldri eiðismann. Rasmus lá í koyggjuni og las í Bíbliuni.

Tá kom hann, sum hevði útkikk á stýrihústakinum niður í lugarið. Hetta var Jens Christian Hammer úr Søldarfirði. Tað var um 5-tíðina seinnapartin. Jens Christian tók hina føroysku heimamissónssangbókina og blaðaði upp og fór at syngja: "Jesunavnið aldri bliknar, slítist ei av tíðartonn". Hann sang hann at enda, og tá ið hann lat bókina aftur – eg síggi hann fyri mær enn, hóast tað eru meira enn 60 ár síðani – og hann legði bókina inn á hyllina aftur, tá brast! Alt gekk sera skjótt fyri seg. Hvussu skjótt, ja, tað hava ikki verið minuttir. Tað var, sum alt fór í knús, so sum skottið niður í lugarið. Báturin rullaði á bakborð, og tá hann so aftur rullaði á stýriborð, fór hann. So skjótt gekk alt fyri seg. Helst er allur botnurin farin undan bátinum. Eg stóð á dúrkinum og datt á dúrkið. Ljósið fór, men tað var opin eldur í lugarinum, so eg sá so frægt, at eg fann. Tí fekk eg í tí sama vent mær móti leytaranum. Eg slapp upp og undan bakkanum og var sloppin aftur um hann, tá fór bakkin undir, so tað vóru sekund, tað snúði seg um. Báturin sýgur so nógv niður, og tá hann søkkur, so sýgur hann okkum við. So hopið var næstan úti um at koma uppundan aftur.

### Gud legði sín kjálka at mínum

Tá kom fram fyri meg: "Gud mín, Gud mín, hví er tú farin frá mær". Og tá, ja, tað ljóðar ótrúligt. Gud kom til mín og segði: "Eg eri hjá tær". Og hann legði sín mjúka kjálka afturat mínum. Hann var eisini mjúkur, kjálkin – og eg kenni sama fløvan enn.

Men tað, sum bjargaði støðuni nokkso nógv var, at eg hevði mist knappin í buksunum. Eg hevði so fingið mær eina nál og sett knappin uppíaftur. Men eg hevði ikki knappað hann uppá selan aftur. Tað hevði eg ikki tíð til, tí hetta hendi so knappliga. So royndi eg at berjast, fyri at sleppa upp úr sjónum og upp í vatnskorpuna aftur. Tá misti eg bæði stivlar og buksur, og hetta gjørdi tað lættari at sleppa uppeftir. Hetta hevur kanska verið avgerandi fyri, at eg bjargaðist.

## Hesir fórust við “Tór II” tann 7. september 1942:


*Jens Chr. Hammer, Søldarfjørður – 27 ár.*


*David Magnussen, Kvívík – 46 ár.*


*Iver Iversen, Kvívík – 32 ár.*


*Rasmus Joensen, Eiði – 52 ár.*


*Joen Dam, Argir – 31 ár.*


*P. Sofus Thomsen, Kollafjørður – 37 ár.*


*Esmar Christiansen, á Stykkinum – 39 ár.*


*J. Sofus V. Jensen, á Stykkinum – 37 ár.*


*Carl Samuelsen, á Stykkinum – 26 ár.*


*Joen Peter Joensen, Langasandur – 50 ár.*


*Joen J. C. Jensen, á Stykkinum – 31 ár.*


*Frank Jacobsen, Skopun – 24 ár.*


*Martin Hansen, Leynar – 28 ár.*


*H. P. J. E. Theodor Joensen, Eiði – 28 ár.*


*Alfred Tage Hansen, Kollafjørður – 23 ár.*


*S. P. M. Petersen, Funningur – 24 ár.*


*Hans Peter Egholm, Streymnes – 22 ár.*


*Joen Poulsen, Ljósá – 48 ár.*

# Kavbátakríggið, sum beindi fyri "Tór 2"

**Í síni bókarøð um Stríðsárini, greiðir Niels Juel Arge frá um hendingina við "Tór 2". Um kavbátakríggið, sum beindi fyri fleiri føroyskum skipum, skrivar Niels Juel m.a.:**



*Tann ljósagrái kavbáturin, miðskeiðis í myndini, er týski U617 kavbáturin, sum søkti føroyska trolaran "Tór 2".*

Sum tað leið út á summarið 1942 mentist verjan hjá amerikanarum móti áganginum frá týsku kavbátunum.

Fimti parturin av stríðnum um Atlantshavið tók seg upp í august. Bæði bretar og amerikanarar hava sett nógv fleiri flogfør og serliga skipaverju til at verja skipafylgi og leita upp týskar kavbátar. Men hesar verjuskipanir røkka ikki tvørtur um Atlantshav, og tí tekur flotaleiðslan til tey ráð, at kavbátarnir skulu í flokki leggjast eftir skipafylgjunum í tí "óvarda holinum", teir kallaðu, har fylgini eru uttan verju frá flogførum. Men tá kavbátarnir leypa á nærri landi, skulu teir skipa sínar atsóknir hvør sær.

Í september 1942 vóru ongantíð færri enn 20 týskir kavbátar á veiðuferð í Norðuratlantshavi í senn. Ein teirra, sum var sendur norður um Føroyar, var U617, sum Oberstleutnant zur See, Brandi, førdi. Hann fór úr Kiel 28. august, og 4. september lá hann mitt í minubyrgingini út av íslendska Eysturlandinum og lúrdi eftir skipum at søkka.

6. september skrivar Brandi í dagbókina kl. 1030, at hann hevur talt brestir av 70 søkkbumbum. Hann otar seg vesturyvir. Á miðdegi ger hann upp, at teir seinasta samdøgrið hava siglt 120 fjórðingar. Klokkan 0900 síggja teir ein oyðara norðanfyri, umleið 5000 metrar burtur. U617 fer djúpari, og teir hoyra eitt skip sigla uppi yvir sær og hoyra eisini brestir av søkkbumbum víða um. Klokkan 2005 eru teir aftur uppi. Tíðliga á morgni 7. september siglir U617 í ein útnyrðing. Ættin er útsynningur megi 4-5.

Kl. 1040 koma teir upp og síggja ein royk í 213 gradir. Ferð varð sett á og siglt eftir roykinum, men teir mistu hann burtur.

Kl. 1225 rakar U617 við ein royk forút, og eitt tvímastrað skip við skorsteini kemur til sjóndar. Skipið krússar ójavnar teinar.

Kl. 1245 brotnar ein ventilur á stýriborðsmotori umborð á U617. Teir verða tí noyddir at leggja stilt í tveir tímar, meðan vælt verður um motorin.

Meðan teir liggja og reka, kemur eitt fjarrit til Brandi, sum gevur honum boð um at fara vestur um Atlantshav á leiðirnar eystanfyri New Foundland. Motorarnir fóru so aftur at ganga, og tað tekur ikki langa tíð hjá U617 við sínum 17 mílum um tíman at taka hitt tvímastraða skipið, sum sigldi 10 míl, aftur.

Kl. 1643 kavar hann og ætlar at torpedera skipið, men beint áðrenn Brandi skuldi loysa torpedina av, broytti skipið kós , so at Brandi misti siktið. Skipið sum krússaði fyri at verja seg var "Tór 2".

Kavbáturin kavaði so aftur og helt á at elta trolaran. Soleiðis sigldu teir í góðar 4 tímar. Tá helt Brandi líkindi vera fyri atsókn og hann kavaði aftur. Samb. dagbókini hjá Brandi var kl. tá 2115.

Umborð á kavbátinum vóru allir mans tilreiðar, og tá klokkan var 2159, skeyt hann tvær torpedoir – fyrst eina úr røri 1 og síðan hina úr røri 2 – eftir havnartrolaranum, sum var 800 metrar burtur.

Umborð á U617 hoyra teir ein stóran og ein lítlan brest. Brandi fór nú upp og segði seg síggja tríggjar bjargingarbátar, fýra flakar, nøkur føt og 30-40 mans flóta á sjónum.

U617 slapp sær til rýmingar. Dagin eftir sendi hann eitt telegram heim til herflotaovastan: "7. september á AE 7672 søkti 1500 BRT farmaskip. Kósin 320 gradir, ferðin 10 fjórðingar. Krússaði."




*Kort yvir ferðina hjá U617, tá hann torpederaði "Tór 2". Hann var komin alla leiðina úr Kiel, og var nú á veg til Amerikastrondina.*



*Helst fór allur botnurin undan "Tór 2", tá hann varð raktur.*

**Í komandi blað greiðir Malmberg frá bjargingini og annars frá sínum framhaldandi sjólívi, har hann aftur varð bjargaður úr vanda.**

# Á slóðini hjá Onnu Evensen

**Í fjør høvdu vit eina røð við endurminningum hjá Onnu Evensen. Hon var dóttir A.C. Lützen, sum var tann fyrsti Lützen í Føroyum. Hon giftist við Jens Christian Evensen, og tey vóru fyrst prestafólk á Viðareiði, síðani í Hvalba og aftan á tað, gjørdist Evensen próstur á Nesi. Seinni orkaði hann ikki hetta harða lívið at ganga og sigla millum bygdir longur, og hann gjørdist prestur í Bregninge á Vestursælandi í 1900. Hann doyði tó longu í 1904.**

Anna flutti aftur til Føroya í eina tíð, men fór so aftur til Bregninge. Her hendi tað hepna fyri eftirtíðina, at ein sum kallaðist Christian Olsen, skrivaði hennara lívssøgu niður, og hetta varð gjørt beint áðrenn hon doyði.

Herviðer varðveitt ein einastandandi frásøgn, sum lutvíst er ein ættarsøga um eina kenda ætt í Føroyum, og lutvíst er ein framúr lýsing av liviumstøðunum í Føroyum í 19. øld.

At søgan kom fram í FF-blaðnum, hevur eisini sína søgu. Fyrst fingu vit frá Esther Djurhuus eitt maskinskrivað handrit við frásøgnini. Her funnu vit slóðina til, hvar upprunahandritið mundi vera. Í hesum sambandi fekst samband við Lokalhistorisk Arkiv í Bregninge. Okkara samband her hevur verið Dorte Weiss, sum frammanundan hevði áhuga fyri Føroyum. Sjálv hevur hon verið í Føroyum og tað hevur pápi hennara eisini. Tey hava bæði skrivað um Føroyar og hava verið hugtikin av okkara landi.

Dorte Weiss fann fram til frumhandritið hjá arvinginum hjá Christian Olsen, Louis Helt. Hann var beinasamur at geva loyvi til at taka avrit av frumhandritinum. Tá vísti tað seg, at her stóð munandi meir enn í umrødda maskinskrivaða handritinum. Afturat hesum, vóru nógvar myndir í handritinum, mest gomul postkort, sum eisini vóru sera áhugaverd. Tískil fingu vit møguleika at endurgeva



*Christian Olsen var ein framúr mentamaður. Hann savnaði m.a. 2.000 dansiløg í økinum, har hann búði. Tað er honum fyri at takka, at tann forvitnisliga søgan hjá Onnu Evensen er varðveitt.*

bókina í síni heild, saman við øðrum tilfari sum vit í hesum sambandi høvdu kannað okkum fram til.

### Aftur á slóðina

Sum greitt frá í seinasta blað, hava vit júst vitjað í Kalundborg. Bregninge liggur nærindis Kalundborg, so avgjørt varð at fara at hitta teir persónar, sum hava gjørt tað møguligt at fáa søguna um Onnu Evensen fram í tí líki, sum hon nú er.

Ein leygardagur varð tískil nýttur í Bregninge, har eg hitti Dorte Weiss og mannin hjá henni, Erwin. Tey eru upprunaliga úr Keypmannahavn, men vildu royna nakað annað, og endaðu "úti á landinum" 100 km burtur. Tey vóru sera blíð og høvdu bjóðað Louis Helt at vera saman við okkum. Tað er hann, sum eigur handritið til søguna um Onnu Evensen. Vitjað varð í kirkjuni, har Evensen tænti síni seinastu ár. Her er hann, saman við konu og dóttur, jarðaður uttandura við kirkjuveggin. Vitjað varð á skjalagoymsluni á Lokalarkivet, har ein hópurin av tilfari er um júst hetta økið á Sælandi; og tað er nógv, sum er hent júst her, sum tað finst hópur av tilfari um. Dorte hevur enntá tosað við eina gamla konu, sum minnist seg hava sæð eina avrætting sum smágenta. Hetta var einasti "stuttleiki" tá á døgum, sum øll fóru til. Men seinni mintist henda gamla, at hetta dámdi henni einki!

### Savnaði 2000 løg

Tann umrøddi Christian Olsen var ein sjáldsamur maður. Hann átti garðin "Torpelund" við Eskebjerg, ein lítil bygd nærindis Bregninge. Hann var ógiftur og nýtti alla sína tíð til at savna fólkaminni av ymsum slag. Garðurin hjá honum varð nærum eitt fornminnissavn, hagar nógv vitjandi komu. M.a. var her eitt stórt savn av fiólum – eisini fiólir, sum vóru bygdar av fólki á økinum. Ein navnframur, lokalur fiólbyggjari kallaðist Niels Winther.

Hansara størsta avrik mundi vera innsavnan av gomlum dansiløgum. Eins og við føroysku kvæðunum, vórðu hesi løg borin frá ættarlið til ættarlið uttan at vera skrivað niður. So her máttu løgini lærast uttanat, og sum frá leið, varð nógv at læra, tí nýggj løg komu til alla tíðina.

Tey fyrstu løgini, sum Christian Olsen skrivaði niður, vóru frá oldurabba sínum. Men abbi hansara byrjaði at skriva niður og tað sama gjørdi pápin, og er tað hetta arbeiðið, sum Christian Olsen hevur hildið fram við. Tá hann hevði skrivað 1100 løg niður helt hann, at nú var tíð uppá at fáa nøkur teirra givin út. Í 1923 gav hann út fyrsta heftið við 74 løgum. Í 1924 gav hann út annað heftið við 74 løgum og í 1927 triðja heftið við 79 løgum. Tá hevði hann savnað 2.000 løg!



GAMLE DANSE
FRA
NORDVESTSJÆLLAND.
III
SAMLEDE OG UDGIVNE
AF
CHRISTIAN OLSEN
HARMONISEREDE
AF
CHRISTIANE RÜTZOU
f. OLSEN

FORLÆGGERENS EJENDOM I ALLE LANDE.
CHR. OLSEN: TORPELUND PR. ESKEBJERG.
TRYKT I NORDISK NODESTIK- & TRYKKERI, KØBENHAVN.
MCMXXVIII

*Hetta er ein av útgávunum hjá Christiani Olsen, sum vísir, hvussu umfatandi hansara virksemi var.*

### Barnið kvaldist, men gildið helt áfram!

Í seinasta heftinum hevur hann eina drúgva frágreiðing um dansimentanina á hesum leiðum.

Hann greiðir frá, at tá foreldrini hjá honum vóru ung, varð hvørt høvi nýtt sum páskot fyri dans og skemt. Her vóru páskot, sum als ikki vóru hugsandi, sjálvt tá Christian Olsen skrivar sína frásøgn. Tað varð m.a. dansað til barsilsgildi, sum tey ríku hildu í heilar tveir dagar. Ofta dansaði mamman fyrsta dansin við tí nýfødda á arminum.

Einaferð kom tað so illa fyri, at aftaná barnadópin vóru so nógv klæði komin at liggja omaná vøgguni, at barnið kvaldist. Hetta tók eingin nakað serliga tungt, og veitslan helt á, sum um einki var hent!

Sum skilst, hevur hetta verið ein sera musikalsk familja hjá Christian Olsen, og sum hann greiðir frá, var hetta eisini eitt umhvørvi, sum aldi talent á hesum økinum, sum í hesum døgum bert kunnu náast við "hægri" útbúgving.

Her kann til stuttleika endurtakast tað, sum Christian Olsen skrivar um abba sín:

Farfader Anders Olsen er født den 9.januar 1808. Farfader, der var en meget kendt og skattet Musiker, var en flot og stadselig Mand, høj, rank, kraftig og særdeles velskabt. Han førte sig udmærket og hans præsen-



*Christian Olsen hevði bóndagarðin "Torpelund", sum í hansara tíð var meira at kalla eitt fornminnissavn.*

**Framhald á næstu síðu**

table Ydre i forbindelse med hans enestaaende musikalske Evner og øvrige brillante Egenskaber, hævede ham højt over Samtidens Bønder. Anders Olsen havde mange Bestillinger. Han var Gaardejer, Sognefoged, Kroejer og Spillemand, men Musikken var dog det som mest optog ham, og han udviklede sig stadig paa egen Haand, saaledes at han snart kunne spille paa baade Violin, Violoncel, Klarinet og Fløjte. Han skrev selv sine Noder. Naar han blot en gang havde hørt en Melodi, kunne han huske den, og han var saa musikalsk, at han uden at prøve den først paa Instrumentet kunde skrive den ned med det samme. Var der nogle Danse der særligt tiltalte ham, udsatte han dem for flere Instrumenter, saa han kunde spille dem sammen med sine Venner eller Børn.

Pápin og pápabeiggin spældu eisini. So sigast kann, at Christian Olsen og hansara systkin høvdu gott til at breðga.

Kr. 200 fyri hálvárið

Sum sagt var Christian Olsen ógiftur, og tann sum kom at arva hann var Louis Helt. Hann er í dag 78 ára gamal, og er ein sera bragdligur gamal maður, sum kann greiða eina rúgvu frá sínum lívi. Sum hansara javnaldrar í Føroyum, hevur hann eisini upplivað broytingar, sum eru heilt ótrúligar.

Louis fór longu sum smádrongur at arbeiða á garðinum hjá Christian Olsen, og her var hann verandi alla sína tíð. Hann fór tó frá, tá hann skuldi konfirmerast!

Lønin var heldur ikki tann stóra. Teir, sum arbeiddu á einum garði, vórðu vanliga settir fyri eitt hálvt ár í senn, og lønin var kr. 200 fyri hálvárið. Tá var fríur kostur og innivist; men innivist mundi ofta vera so sum so. M.a. var sjáldan nakar hiti í kamarinum. So tá kalt var, kundu tey vátu klæðini, sum farið var úr um kvøldið, vera stívfryst morgunin eftir, tá farast skuldi aftur til verka.

Skúlagongdin á smáplássum mundi ikki vera øðrvísi í Danmark enn í Føroyum, tí gingið var í skúla annan hvønn dag. Hetta var tó ikki nøkur forðing fyri at kunna klára seg!

Louis kendi eisini sera væl Ingeborg Andersen, sum helt hús hjá Evensen-hjúnunum í Grønlandi, har Johan Evensen var kolonibestýrari fyrst í hini øldini. Vit hava greitt frá henni fyrr og høvdu til jóla eina frásøgn um jólini í Umanak í 1907. Vit koma seinni at hava meir frá hennara hond. Louis sigur hana at hava verið eina heilt serliga kvinnu. Vit vóru annars eisini á grøvini hjá henni hendan dagin.




*Inni í kirkjuni í Bregninge er yvirlit yvir prestarnar, sum hava tænt her. Millum hesar er "okkara" Jens Christian Evensen, sum virkaði frá 28/3 1900 til 23/7 1904.*

Garður við 150 neytum

Louis Helt giftist heldur ikki. Hann arvaði sum sagt garðin eftir Christian Olsen, men fyri nøkrum árum síðani seldi hann garðin og flutti inn í eini hús beint við. Higar tók hann eisini "fornminnini" hjá Christian Olsen, og tískil eisini bókina hjá Onnu Evensen, sum var eintakið hjá Christian Olsen, sum hann eisini arvaði.

Hann gjørdist tískil granni hjá Dorte Weiss, og hetta gjørdi tað lættari at finna bókina fram.

Nýggi eigarin av "Torpelund", Niels Møller, má sigast at vera stórbóndi. Hann hevur 150 neyt, men tey eru bert til kjøtframleiðslu. Niels Møller er ein ungur maður við nýhugsan. Neytini ganga leys inn í fjósinum. Hetta bøtir nevniliga nógv um trivnaðin. Um summarið sendir hann neytini við kálvum út á eina lítla oyggj, Nekselø, nærindis. Her passa tey seg sjálv og kálvarnir súgva frá kúnum.

Á garðinum verður dyrkað mangt og hvat m.a. asiur og reyðkál, so sigast kann, at hetta er nakað, sum ber til.

Vitjanin í Eskebjerg, Bregninge var nú av. Men sambandið verður uttan iva hildið við líka. Takkað veri Onnu Evensen!



*Vitjað varð inni á lokalarkivinum beint við kirkjuna í Bregninge. Frá vinstru síggja vit: Erwin Weiss, Louis Helt og Dorte Weiss, sum hvør hevur havt sín leiklut í, at søgan hjá Onnu Evensen kundi lýsast, soleiðis sum hon varð gjørd. Arkivið hevur góðar umstøður. Tað hevur fingið innivist uppi á loftinum á einum røktarheimi.*



# Sjálvuppgávan 2003

**Sjálvuppgáva**
Hevur tú móttikið eina sjálvuppgávu og ert løntakari **skalt** tú útfylla hana og lata hana innaftur til eina av økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovuni í seinasta lagi 15. mars 2004. Fyri tey, sum eru roknskaparskyldug, eru aðrar freistir galdandi.

**Skattauppgerð**
Hevur tú móttikið eina skattauppgerð, skalt tú kanna, at allar upplýsingarnar eru rættar. Eru allar upplýsingarnar rættar, skalt tú onki gera.

Eru upplýsingarnar skeivar ella vanta upplýsingar, t.d. B-inntøkur ella frádráttir, skalt tú útfylla eina sjálvuppgávu og senda hana inn. Sjálvuppgávan fæst á økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya kring landið. Eisini er hon í bóklinginum 'Skatturin 2003'.

**Ognaruppgerð**
Í ár fáa allir løntakarar eisini eina ognaruppgerð sendandi, sum **skal** latast inn aftur til eina av økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovuni í seinasta lagi 15. mars 2004.

**Kapitalvinningssjálvuppgáva**
Øll hava móttikið eina kapitalvinningssjálvuppgávu. Um tú hevur aðrar kapitalvinningsinntøkur og/ella upplýsingar á kapitalvinningssjálvuppgávuni, sum ikki eru rættar, skal kapitalvinningssjálvuppgávan útfyllast og latast einari av økisskrivstovunum í seinasta lagi 15. mars 2004.

Um fullfíggjað sjálvuppgáva ikki er latin inn rættstundis, eins og frammanfyri er ásett, hevur Toll- og Skattstovan heimild at meta inntøkuna og harafturat at áleggja sekt.

**Vitja eisini heimasíðu okkara á www.tollskatt.fo**

Argir, tann 17. februar 2004
**Toll- og Skattstova Føroya**


**Tíðindaskriv frá Kaupthing:**

## 2003 var nøktandi

2003 royndist betur fyri Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F enn undanfarin ár.

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F hevði eitt úrslit áðrenn skatt á 2.417 tkr. og eitt úrslit eftir skatt á 1.948 tkr. Hetta svarar til eina renting av eginpeninginum á 17%. Tá hugsað verður um, at felagið framvegis nýtir orku og pening uppá at menna nýggj virkisøki, er úrslitið nøktandi.

Úrslitið av fíggjarpostum gjørdist 11.915 tkr. Hetta er ein hækking á 28% í mun til 2002. Samlaðu útreiðslurnar vóru 9.402 tkr, og svarar tað eina hækking á 1,7% í mun til 2002.

Fíggjarstøðan javnvigar við 15.061 tkr. Eginognin var við ársenda 2003 13.379 tkr. og solvensurin var 92% í mun til minstakravið á 8%.

Gongdin á virðisbrævamarknaðunum var í 2003 munandi lagaligari enn undanfarnu árini. Partabrøv hækkaðu sum heild munandi, meðan lánsbrøv stóðu seg lutfalsliga væl. Í farna árinum er kappingin um ognarrøkt harðnað, og sæst hetta partvíst aftur í lækkandi inntøkum á økinum. Hóast tað harðnaðu kappingina hevur Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F hildið tørn, tá talan er um samlaðu ognirnar undir umsiting. Í miðal umsat Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F ognir svarandi til umleið 1,1 milliard kr í 2003.

Vinnutænastur vóru í 2003 eitt munandi virkisøki hjá Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F. Felagið hevur í árinum fyriskipað kapitalhækkingar fyri føroysk feløg og hevur verið ráðgevi í sambandi við størri ný- og umfíggingar hjá føroyskum fyritøkum. Umframt hetta hevur felagið eisini verið ráðgevi hjá bæði føroyskum og útlendskum feløgum í sambandi við keyp av ognarlutum í øðrum felagi.

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F tók í 2003 stig til at seta á stovn P/F Fastogn. P/F Fastogn hevur sum endamál at keypa, reka og útleiga fastognir í Føroyum.

**Tíðindaskriv frá Kaupthing:**

## Kaupthing yvirskot á 645 milliónir í 2003

Kaupthing Bank samtakið hevði í 2003 eitt yvirskot svarandi til 645 milliónir føroyskar krónir eftir skatt. Talan er um ein vøkstur á 40% í mun til 2002.

Samlaðu fíggjarinntøkurnar vóru 2.729 milliónir kr., meðan samlaði kostnaðurin var 1.588 milliónir kr.

Fíggjarstøðan hjá Kaupthing Bank javnvigaði við 47,9 milliardum kr. Harav eru latin lán til viðskiftafólk fyri 30,1 milliard kr. Samlaðu avsetingarnar móti tapum vóru 334 milliónir kr í 2003.

Eginpeningurin við árslok var 3.949 milliónir kr. og solvensurin hjá Kaupthing Bank er 14,2%.

Nevndin í bankanum fer at skjóta upp fyri aðalfundinum at rinda 113 milliónir í vinningsbýti – svarandi til 18% av yvirskotinum.

Úrslitið fyri 2003 er gott og fjórði ársfjórðingur var tann besti í allari søguni hjá bankanum. Styrkin av sparingunum í sambandi við samanleggingina millum Kaupthing og Búnaðarbankann hava víst seg skjótari enn væntað. Harumframt er virksemið uttanfyri Ísland nú veruliga byrja at kasta av sær.

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F almannakunngerð í næstu viku úrslitið fyri virksemi í Føroyum.

# Føroyingar við New Foundland

Tað er vanliga fatanin hjá okkum eitt sindur yngri í garði, at føroyskur fiskiskapur við New Foundland byrjaði í 1956 við "Atlansfarinum". Hetta hevur eisini verið ført fram her í blaðnum, m.a. í seinasta blað. Men hetta er bæði rætt og skeivt.Tað er rætt, at okkara skipaða línuveiða gjøgnum 40 ár við New Foundland, og serliga á Flemish Cap, byrjaði tá.

Men tað hoyrir eisini við til okkara fiskiskapssøgu, at royndir hava verið gjørdar undan hesum, og var tað ein av okkara kendu skiparum, Kvívíks-Tummas, sum stóð fyri teimum royndum, sum vórðu gjørdar. Tummas gjørdist í 1914 skipari á Streymoynni, bert 21 ára gamal. Tummas var ein kendur pressari, so í 1916 fóru teir til New Foundlands, sum tá var óroynd fiskileið hjá føroyingum. Skipið var ikki tað besta og hetta var mitt í seinna veraldarbardaga, so her hevur verið áræði við lít.

Teir fóru helst avstað í apríl.Teir høvdu bátar við og teir brúktu línu. 16. oktober komu teir aftur á Havnina við 232 skippundum.

Í grein í Tingakrossi varð sagt, at teir høvdu 31 dagar um ferðina yvir. Ókunnigir, sum teir vóru, raktu teir ikki við bestu fiskiplássini, fyrr enn tað fór at nærkast heimferðini.Teir seinastu 14 dagarnar fingu teir helvtina av allari veiðuni. Skipið fóru niður til Keypmannahavnar at landa, og her varð lastin seld fyri kr. 18.589. Eitt av ferðafólkunum upp var Andrea Árting, sum gjørdist ein kend fakfelagskvinna.



*Kvívíkar Tummas.*



*Fýra av manningini á "Streymoynni" í Keypmannahavn heystið 1916. Frá vinstru: Ábraham Abrahamsen, Strendur, kallaður Ábram Uppi í Trøð. Sámal Hansen, við Sjógv, Strendur.Tummas Dam, Tórshavn, kallaður Dáva Tummas, ættaður av Heyggi í Kollafirði. Karl Petersen, Vestmanna, ættaður úr Vík og kallaður Karl úr Vík.*

## Royndin við Rosenhjem

Tummas hevur so ikki mist hugin á New Foundlandi. Í 1922 fór hann at føra danska skipið "Rosenhjem" til fiskiskap við New Foundland. Tummas skuldi biðja 25 føroyingar við. Hann lýsti longu í januar í bløðunum eftir fólki og tilskilaði, at mynstrað varð eftir føroyskum sáttmála.

Teir fingu fisk, men tað manglaði agn og eingin høggusløkkur var at fáa. Kokkurin var dani, og hann sendi eitt bræv heim, sum endaði í Svendborg Avis, har hann m.a. annað skrivaði um túrin:

*Disse færøske Fiskerfolk viste seg at være ualmindelig godmodne og nøjsomme, og der kommer aldrig en Klage over den tarvelige Kost over deres Læber... De er ligegyldige med alt andet end deres Fiskeri, som de til gengæld vier alle deres Kræfter.*

*...Turen til Saint Pierre tog 28 Dage, og vi havde en meget haard Rejse. Efter at have udrustet i Saint Pierre gik vi endelig til The Great Banks of New Foundland, ca. 300 miles fra Saint Pierre. Vi havde ikke kunnet faa Sild til Madding i Saint Pierre, men fik nu fra en fransk Fiskeskonnert nogle Torskehoveder, som fæstnes i Nettene. Goggerne suger sig nu fast til Torskehovederne... (og vóru so brúktar til agn)*

*Fiskeriet har hidtil ikke svaret til vore Forventninger, da vi kun har fået 37 Tons Fisk paa en Maaned, men vi har ogsaa haft et meget daarligt Vejr.*

Farið varð ikki aftur til New Foundlands. Komandi árini var "Rosenhjem" á vanligum leiðum undir Íslandi.

Men árið 1926 gjørdist eitt vanlukkuligt ár hjá "Rosenhjem". Tá fóru teir til Íslands á sildaveiðu. Fyrsta vanlukkan hendi 14. august, tá 1. bestimaður, Ábraham av Srondum, datt fyri borð og druknaði. Hann varð fingin aftur og varð jarðaður á Hrísey.

Næsta vanlukkan hendi 9. september. Tá sigldi íslendski trolarin "Jón Forseti" á jaktirnar, sum vórðu nýttar til sildaveiðuna. Tá doyðu tríggir menn, og millum hesar Theanjardus, pápi Tummas, sum annars sjálvur kom illa til skaða.

Seinni sama ár søkkur "Rosenhjem" á veg til Danmarkar við fiskalast.

Hervið hava vit vist fingið tað mest umráðandi um fyrsta fiskiskapin við New Foundland. Tá hugsað verður um allar tær nýggju leiðirnar, sum føroyingar hava roynt undir teimum mest truplu umstøðunum, má tað sigast at vera undrunarvert. Men tað er teimum fyri at takka, at vit eru komin so væl fram, sum vit hóast alt eru í dag.




*Tekning av "Streymoynni", fyrsta føroyska skip undir New Foundlandi.*


## Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

# Anna Askham 103 ár

Tann 5. mars verður elsti føroyingur, Anna Askham, 103 ár. Vit høvdu tann heiður seinasta heyst at kunna hava eina drúgva samrøðu við hesa megnar kvinnu, sum framvegis er heilt byrg og klár. Hon kundi m.a. greiða frá kongavitjanini í Havn í 1907!

Anna er framvegis sera byrg, sum tað eisini sæst á myndini, sum vit tóku av henni um dagarnar.

Vit hava sum sagt lýst lívið og eginleikarnar hjá Onnu og fara ikki at endurtaka nakað av hesum á hesum sinni.

Men sum vit greiddu frá, var Anna áhugað í at taka myndir, sum hon enntá eisini framkallaði sjálv. Vit vilja ynskja Onnu hjartaliga tillukku og vilja endurgeva nakrar av myndunum, sum hon hevur tikið á yngri árum.



*Hendan myndin er tikin beint uttanfyri barnaheimið hjá Onnu á horninum C. Pløyensgøta/N. Pállsgøta. Tey eru f.v.: Jákup Luth, Martha, Sonja, Johannes Juel, Gunnleyg og Eyðfinn Sondum, sonur Ragnhild.*



*Gentan aftanfyri er Gunnleyg, dóttir Poulinu, systir Onnu. Frammanfyri eru frá vinstru: Tummas Juel og Svend, synir Onnu. Millum sín hava teir Jórun, dóttir Marthu Matras, systi Onnu.*



*Her eru tey helst á útferð. Pápin Onnu við hvíta skegginum stendur á landi. Maðurin umborð er Jóan Jákku, skómakarin, sum var svágur Onnu.*



*Her hevur Anna avmyndað nøkur av børnunum, helst á eini útferð. F.v. eru tað Torleif, Martha, Jórun, dóttir Marthu og Svend.*



*Hetta eru húsini í Kollafirði, hagani mamma Onnu var ættað, og har hon plagdi at vera hjá mammubeiggjanum Niclasi.*



*Familjan helt nógv saman og var ofta saman á útferð, her við tjaldi. Aftanfyri t.v. er abbin Jákup, frammanfyri hann er Hans Holm (skallutur), næstur í føroyskari húgvu er Jóan Jakku. Síðan Ragnhild, ókendur og Jens. Frammanfyri yngra ættarliðið.*



*Her síggjast f.v. aftara rað: Lisa við Jórun í fanginum, Martha, systir Onnu, Sigga, Margretha. Frammanfyri: Begga, Svenn, Bjørg, Johs. Juul og Martha.*



*Hesa myndina kann Anna ikki hava tikið, tí hon er sjálv á henni. Hon er í aftara rað nr. 2 f.v. Myndin er tikin uttan fyri hjá Onnu og Símun.*

## Bjargingarútgerð
*á sjógvi og landi*

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*

- Bjargingarbátar
- Bjargingarnet
- Yvirlivilsisdraktir
- Flótidraktir
- Bjargingarvestar
- Bjargingarkransar
- Epirbar/neyðsendarar
- Radartranspondarar
- Eldsløkkjarar
- Eldávaringar
- Branddraktir
- Umvælingar
- Eftirlit



**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo



## Skal skipið vaskast?
**Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ**

- Serkunnleiki innan vasking av aptering
- Vasking av maskinrúmi
- Reinsa teppi
- Bona gólv
- Reinsa koyggju og forheng
- Reinsa gamalt bonivoks
- Seyma nýggj forheng
- Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.
- Brúsubakkar "Homequeen vinyl"
- Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið

**Eysturoyar Reingerð**
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo



## MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64






**Vit framleiða og umvæla øll sløg av trolum, so sum:**
■ Rækjutrol ■ Botntrol ■ Flótitrol ■ Semipelagisk trol

**Vit framleiða og umvæla snurpunótir til:**
■ Loðnu ■ Makrel ■ Sild

**Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:**
- Vaska og impregnera nótir
- Levera komplettar fortoyningar, akker, tog o.a.

**Annars hava vit alla útgerð til trol, nótir og alivinnuna**

**VÓNIN LTD.**

**Høvuðsskrivstova:** Vónin P/F, Bakkavegur 22, 530 Fuglafjørður, Telefon 444 246, Telefax 444 579, www.vonin.com

**Tórshavn:** Áluker, Telefon 35 43 91, Telefax 31 33 19

**Miðvágur:** Telefon 33 29 46






**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆vælkomin inn á gólvið

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo



## Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

## *Sp/f Contrive Jsp Ltd.*
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# Menninir eru av Ekliptiku



"Normanner".



"Ekliptika".

Tað gongur væl at fáa upplýsingar um tær gomlu myndirnar av skipsmanningum, sum vit hava havt í blaðnum. Um myndina av manningini á "Normanner" hava vit fingið ta upplýsing aftrat, at myndin er frá 1934, tá teir landa fisk undan Grønlandi.

Hetta hevur Hans Olsen greitt okkum frá. Hann er nr. 11 á myndini, og var hetta hansara fyrsti túrur til skips. Pápi hansara, Dánjal, er nr. 15 á myndini. Hann var ættaður av Sandi.

Sambært John Lassen, í Klaksvík, er henda myndin frá 1934. Sagt verður í bókini um "Ekliptiku":

Teir hava verið við "Ekliptiku" á Suðurlandinum og landa her tosk, sum er fiskaður í Meðalandsbauktini. Menninir eru frá vinstru:

Jóan Petur Brekku, Eiði, Hans Petersen, Sandavágur, vanliga kallaður Dal-Hans (ættaður úr Gásadali) og Henry Joensen, Gjógv. Hesin seinasti fórst við "Ekliptiku" undir krígnum.

# Aðrar myndir

**Vit hava fingið fleiri forvitnisligar myndir frá Føroya Fornminnissavni. Tey, sum vita meira um hesar myndirnar, kunnu venda sær til okkum.**







*Nr. 1 á myndini omanfyri er Óla Jákup Jensen úr Kvívík. Hvørjir eru hinir og í hvørjum sambandi er myndin tikin?*







# Vatntrot

Guds løkur er fullur av vatni.
*Sálm. 65,10*

Einki vatn kom úr krananum. Vatngoymslan var tóm. Løgið, tí áin, har rørini til goymsluna lógu út í, rann í stríðum streymum. Eftir at hava kannað málið var niðurstøðan tann, at ristin, sum lá frammanfyri rørini, var tipt. Áarføri hevði verið, og tá gjørdist áin stór og tók gras, mosa og annað við sær, sum legði seg í ristina og tipti hana. Tá lítið og einki vatn kom til rørini, tømdist vatngoymslan - hóast nógv vatn var í ánni.

Hendingin talaði soleiðis tíl mín, at hóast Guds løkur er fullur av vatni, Sálm. 65,10, hóast Gud bjóðar menniskjum at oysa vatn av frelsunnar keldu við gleði, Jes. 12,3, og hóast Jesus segði: "Er nakar tystur, tá komi hann til mín og drekki!" Joh. 7,37, so uppliva mong menniskju kortini andaligan turk.

Hetta er fyrst og fremst galdandi fyri heimsins børn.

Tey kenna hvørki Jesus ella tað livandi vatnið, hann hevur at geva. Lív teirra er ein andalig oyðimarkargongd, hóast lummarnir kunnu vera fullir av silvuri og gulli.

Vegna manglandi stillar løtur við Jesu føtur eru tað tíverri eisini mong Guds børn, sum kenna til andaligan turk.

Orsøkin er ikki Guds, tí løkur hansara er fullur av vatni. Man orsøkin vera, at "ristin"er tipt? Grøs, mosi og annað kunnu her vera myndir uppá syndir, sum forða fyri "náðarstreyminum" frá Jesusi.

Tað nyttar einki at hava bíbliuna á hillini, um tú ikki **tekur tær tíð** at lesa í henni.

Títt kamar verður ikki eitt "loynikamar", uttan tú **tekur tær tíð** til bøn.

Líkasæla, skundur, sjálvsøkni... eru syndir, sum "tippa" fyri Jesusi.

Kirkjur og onnur guds hús gagna tær einki, um tú ikki kemur har fyri at hoyra gleðiboðskapin og vera saman við Guds børnum.

Leti, líkasæla, mannaótti,... eru syndir sum "tippa" fyri Jesusi.

Tú kennir óivað syndirnar, sum "tippa" fyri Jesusi, og sum steingja hann úti frá tínum lívi. Um ikki, bið so Jesus kunna teg um tær. Játta syndirnar, bið um fyrigeving og um mátt til – í Jesu navni – at stríðast ímóti teimum.

Tá upplivir tú ikki vatntrot, men at Guds løkur er fullur av vatni.

*Tystandi hjarta, ein rødd til tín ljóðar,*
*livandi vatn fyri einki tær bjóðar;*
*tað er tín Jesus, við tárum hann spyr teg nú:*
*:/:Kemur tú ei brátt?:/:*

*Ms. 291*

# Skipsbygging
# Reparasjon

**DOKKING**

**Kapasitet: Fartøylengde 140 m - Fartøybredde 26,5 m - Fartøydybde 6,5 m.**
**Løftekapasitet: 7600 tonn - Brønn for Azimuth propeller: 7 x 4 x 2,7 m.**



WESTCON 's skips- og offshoreverft i Ølen

Krohn Johansen Forlag AS, Larvik -03



**M/S KRÜNBORG** -Bygg nr.16.

**WESTCON i Ølen utfører:**

- Nybygg - Ombygginger
- Dokking - Skipsreparasjoner
- Prosjektering - Konstruksjon
- Seksjonsbygging - Klassing

*Din samarbeidspartner fra idé til levering*

WESTCON
WEST CONTRACTORS AS
N-5582 Ølensvåg, NorwayTel: +47 53 77 50 00 - Fax: +47 53 77 50 01
E-mail: westcon@westcon.no - www.westcon.no



EIN
# ØÅRVÍSI
## MIÐNÁMSÚTBÚGVING

Vit bjóða eina 3-ára yrkisgymnasiala útbúgving, sum gevur atgongd til víðarigangandi og hægri lærustovnar. Tú kanst eisini fara beinleiðis í starv í vinnuni.

Tey, sum heldur ynskja at fara í læru í fiskaídnaðinum ella í alivinnuni, taka støðisárið á skúlanum.

**Ring ella send okkum teldupost og fá meira at vita!**

Fiskivinnuskúlin er m.a. kendur fyri:

- Spennandi næmingaverkætlanir
- Tvær ferðir vunnið europameistaraheitið í "European Business Game"
- Kókibókin "Góður matur úr sjónum", sum næmingar gjørdu.
- Fiskamarknaðir og spennandi uttanlandsferðir

**FISKIVINNUSKÚLIN**

Postrúm 96 · 350 Vestmanna · Tel. 424573 & 424496 · fax 424428
www.fiskvest.fo · fiskvest@fiskvest.fo

# Línubustir og goggar

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttisliô** (limur í Føroya blindafelag)

# FF-blaðið

Vitja heimasíðuna
www.fiskimannafelag.fo

## *P/f Jógvan Weihe*
*Heil- og smásøla*

*Vit hava m.a:*

- *Nylon*
- *Skeiðhúkar*
- *Pilkar*
- *Snellustroppar*
- *Svøvlar*
- *Lodd*
- *Kryvjingarknívar*
- *Rognaknívar*
- *Rognaposar*
- *Beitur v/ rustfríum húki*

***...stórt úrval av fiskireiðskapi til norðhavsróðurin***
***...landsins lægstu prísir***

*Staravegur 15 · Tlf: 31 38 97 · Fartlf: 21 38 97 · Fax: 31 38 83*
*T-postur: jwimport@post.olivant.fo*
*Heimasíða: www.jogvan-weihe.fo*

***Føroya største úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir***

***Vit útvega eisini:***
*Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir*
*Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur*
*Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni*
*Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari*

*... sjálvandi til besta prísin !!*

**FARPACK**

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569

# Tunnusláttur á Ellisheiminum

**Vit vóru til tunnusláttur úti á Ellisheiminum mánadagin, og her gekk tað ikki minni lívligt til enn í nøkrum barnagarði. Vit hava nakrar myndir.**



*Jona Henriksen reiggjar til. Við sínum "bert" 80 árum man hon vera ein unglingi á Ellisheiminum.*



*Tað var eisini brúk áskoðarum. Her síggja vit frá vinstru, Sigrid Dalsgaard, Kristinu Helenu Debes, Onnu Askham, Borghild Lindberg og Hedavik Nolsøe.*



*Tað yngra ættarliðið slapp eisini framat.*



*Her hevur 91 ára gamla Jana Jacobsen nýtt gassan. Jana er systir Ingvard Jacobsen, sum eisini hevur verið skrivari í FF.*



*Annelin Thomassen, 85 ár, langar til. Annelin er dóttir Kvívíks Tummas, sum er umrøddur aðra staðni í blaðnum.*

## dagsins MYND

Sum nevnt aðra staðni í blaðnum fyllir Anna Askham 103 ár tann 5. mars. Vit vóru um dagarnar úti á Ellisheiminum, tá tey høvdu ítrív. M.a. loftaðu tey ein bólt millum sín. Her hevur Anna fingið bóltin, og hon heldur fast sum ein annar hondbólts spælari!



## Puss fiskurin

**Hjá bakaranum:**
– Mamma bað meg siga, at tað var ein fluga í rosinbreyðnum, hon keypti í gjár.
– So, var tað tað? Heilsa mammu tíni og sig, at um hon kemur aftur við fluguni, skal hon fáa eina rosinu í staðin.

*****

Keypmaðurin: – Hvussu skjótt virkar ein slík lýsing?
Lýsingamaðurin: – Hósdagin lýsti ein av mínum kundum eftir náttarvakt, og somu nátt var onkur, sum tømdi peningaskápið hjá honum…

*****

Ein kvinna kom á bilverkstaðið og bað um ein nýggjan oljupinn.
Mekanikarin spurdi, hvat var galið við tí gamla.
– Hann er blivin ov stuttur og røkkur ikki niður til oljuna longur, svaraði konan.

*****

**Hoyrt hjá læknanum:**
Tú kanst takka ungdómi tínum og styrki tíni fyri, at tú ert á lívi í dag!
– Fínt, so skyldi eg altso ikki tær nakað?

*****

Ein kona stóð við ein ynskibrunn í Rom, og tá hon blakaði myntina í brunnin, segði hon: Eg vil gjarna sleppa frá at skifta blæu, vaska upp, gera reint, keypa inn og gera mat!
– Og hokus-pokus… so bleiv hon til ein mann…

*****

Húsmøðrafelagið savnaði saman til loppumarknað, og tær lýstu soleiðis við tí: Vit taka ímóti øllum gomlum, sum tú ikki hevur brúk fyri longur. Tak mannin við!